NORÐOYA SPARIKASSI

# Ársfrásøgn 2017

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Fuglafirði:
Í Støð 7
FO-530 Fuglafjørður
Tel. 475000

Deildin í Tórshavn:
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. 475000
Fax 476015

# Missión

Norðoya Sparikassi er ein sjálveigandi sparikassi,
sum skal gera mun í føroyska samfelagnum
við at veita fíggjarligar tænastur til privat og vinnurekandi.
Norðoya Sparikassi vil vera við til at styrkja møguleikan
at búgva og virka í egnum nærumhvørvi.

# Innihaldsyvirlit


LEIÐSLUFRÁGREIÐING

NEVND, UNDIRNEVNDIR OG STJÓRN 5

UMBOÐSRÁÐ 7

5-ÁRA YVIRLIT 8

LEIÐSLUFRÁGREIÐING 9

ROKNSKAPARFRÁGREIÐING 12

VÁÐAR OG VÁÐASTÝRING 17

ÁRSROKNSKAPUR

LEIÐSLUÁTEKNING 20

VÁTTANIR FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARUM 21

RAKSTRARROKNSKAPUR 23

FÍGGJARSTØÐA - OGN 24

FÍGGJARSTØÐA - SKULD 25

ÚTGREINING AV EGINPENINGI 26

KAPITAL- OG SOLVENSUPPGERÐ 27

YVIRLIT YVIR NOTUR 28

NOTUR - NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR 29

NOTUR 36

# Nevnd, undirnevndir og stjórn

## Nevnd

John Petur Danielsen, cand.polit.
Argir. Føddur 1949.
(nevndarformaður)
Innkomin í nevndina í 2009 og stendur fyri vali í 2018
Nevndarsamsýning: tkr. 199
Onnur leiðslustørv: einki

Jóannes Hansen, studentaskúlalærari, cand.mag.
Toftir. Føddur 1955.
(næstformaður)
Innkomin í nevndina í 2007 og stendur fyri vali í 2019
Nevndarsamsýning: tkr. 144
Onnur leiðslustørv: einki

Jóhanna á Tjaldrafløtti, skúlastjóri,
føðslu- og húsarhaldsfrøðingur, dietist
Klaksvík. Fødd 1962.
Innkomin í nevndina í 2008 og stendur fyri vali í 2019
Nevndarsamsýning: tkr. 97
Onnur leiðslustørv: Lætt & Leskiligt Sp/f, stjóri

Karl Heri Joensen, grótlaðari, bóndi
Klaksvík. Føddur 1955.
Innkomin í nevndina í 2011 og stendur fyri vali í 2020
Nevndarsamsýning: tkr. 97
Onnur leiðslustørv: KHJ Nýgerð Sp/f, stjóri

Petur Alberg Lamhauge, ráðgevi, cand.merc.
Hoyvík. Føddur 1948.
Innkomin í nevdina í 2012 og stendur fyri vali í 2018
Nevndarsamsýning: tkr. 99
Onnur leiðslustørv: einki

Frimodt Rasmussen, stjóri
Klaksvík. Føddur 1968.
Innkomin í nevndina í 2014 og stendur fyri vali í 2020
Nevndarsamsýning: tkr. 97
Onnur leiðslustørv: Klaksvíkar Sleipistøð P/f, stjóri

Guðrið Lava Olsen, vinnukundaráðgevi
Leirvík. Fødd 1962.
Starvsfólkavald
Innkomin í nevndina í 2008 og stendur fyri vali í 2020
Nevndarsamsýning: tkr. 97
Onnur leiðslustørv: einki

Tummas Martin Sólsker, vinnukundaráðgevi, HD-R
Klaksvík. Føddur 1977.
Starvsfólkavaldur
Innkomin í nevndina í 2012 og stendur fyri vali í 2020
Nevndarsamsýning: tkr. 97
Onnur leiðslustørv: einki

Janus Joensen, KT-leiðari
Klaksvík. Føddur 1972.
Starvsfólkavaldur
Innkomin í nevndina í 2016 og stendur fyri vali í 2020
Nevndarsamsýning: tkr. 97
Onnur leiðslustørv: einki

## Grannskoðaranevnd

John Petur Danielsen, innkomin í grannskoðaranevndina í 2010, samsýning tkr. 12
Jóannes Hansen, innkomin í grannskoðaranevndina í 2010, samsýning tkr. 6
Petur Alberg Lamhauge, innkomin í grannskoðaranevndina í 2012, samsýning tkr. 6

## Váðanevnd

Váðanevndin er mannað við øllum nevndarlimum sparikassans.
John Petur Danielsen er formaður í váðanevndini.

## Lønarnevnd

Lønarnevndin er mannað við øllum nevndarlimum sparikassans.

## Stjórn

Marner Mortensen, stjóri, HD-R, cand.merc.aud
Klaksvík. Føddur 1963.
Innkomin sum stjóri 12.03.2010
Onnur leiðslustørv: Elektron, nevndarlimur

# Umboðsráð

| | | | |
|---|---|---|---|
| ABSALON Í BUÐ | FO-740 HVANNASUND | JÓGVAN EDMUND Á GEILINI | FO-765 SVÍNOY |
| ALEXANDUR JOENSEN | FO-700 KLAKSVÍK | JÓGVAN JOENSEN | FO-798 TRØLLANES |
| ANDREAS JOSEPHSEN | FO-700 KLAKSVÍK | JÓHANNA Á TJALDRAFLØTTI | FO-700 KLAKSVÍK |
| ANNA MARIA JOENSEN | FO-700 KLAKSVÍK | JOHNNY OLSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| BERGUR Á REYNATRØÐ | FO-620 RUNAVÍK | KARL HERI JOENSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| DEBES CHRISTIANSEN | FO-730 NORÐDEPIL | KJARTAN HANSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| ERLING PETERSEN | FO-700 KLAKSVÍK | KRISTIAN MARTIN RASMUSSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| EYÐÁLVUR M. JOENSEN | FO-100 TÓRSHAVN | MARKUS TUMMAS Á GRAVARBØ | FO-700 KLAKSVÍK |
| EYÐUN NOLSØE | FO-700 KLAKSVÍK | MORTAN JOHANNESEN | FO-100 TÓRSHAVN |
| FINN KJØLBRO | FO-700 KLAKSVÍK | MUNDA LANGAARD | FO-520 LEIRVÍK |
| FRIMODT RASMUSSEN | FO-700 KLAKSVÍK | NIELS V. PETERSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| GULLAK GULLAKSEN | FO-767 HATTARVÍK | OLIVUR THOMSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| HANS JÁKUP KALLSBERG | FO-750 VIÐAREIÐI | POUL JACOB ZACHARIASSEN | FO-740 HVANNASUND |
| HANS JOSEPHSEN | FO-700 KLAKSVÍK | SIGGVARD JOENSEN | FO-100 TÓRSHAVN |
| HANUS P. N. KJØLBRO | FO-750 VIÐAREIÐI | SÓLEY KLETTSKARÐ Í KONGSSTOVU | FO-785 HARALDSSUND |
| HEINI ÓSÁ | FO-700 KLAKSVÍK | STEFFAN ROSENLUND OLSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| HERGERÐ ZISKASON | FO-700 KLAKSVÍK | SØREN ZISKA JACOBSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| HILMAR KALSØ DANIELSEN | FO-700 KLAKSVÍK | TÓRBJØRN JACOBSEN | FO-625 GLYVRAR |
| JOHN P. DANIELSEN | FO-160 ARGIR | VICTOR NIELSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| JÓANNES HANSEN | FO-650 TOFTIR | | |

# 5-ára yvirlit

| Lyklatøl | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 19,2 | 19,1 | 19,0 | 18,2 | 19,4 |
| Kjarnukapitalprosent | 17,2 | 16,9 | 16,7 | 15,9 | 17,1 |
| Renting av eginpeningi áðrenn skatt | 7,2 | 7,1 | 4,5 | 6,9 | 3,4 |
| Renting av eginpeningi aftaná skatt | 8,0 | 7,1 | 7,4 | 6,8 | 3,4 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,27 | 1,25 | 1,14 | 1,18 | 1,08 |
| Rentuváði | 1,7 | 2,3 | 2,5 | 1,1 | 1,9 |
| Gjaldoyrastøða | 0,7 | 0,3 | 0,3 | 0,4 | 0,3 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og niðurskrivingar í mun til innlán | 82,8 | 81,5 | 82,9 | 87,5 | 91,0 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 168,3 | 176,1 | 169,6 | 123,4 | 188,2 |
| Stórir kundar í mun til kapitalgrundarlag | 41,4 | 46,3 | 47,5 | 41,1 | 40,9 |
| Partur av ágóða við niðursettari rentu | 0,5 | 0,7 | 1,6 | 3,0 | 4,0 |
| Akkumulerað niðurskrivingarprosent | 1,9 | 1,8 | 2,2 | 2,6 | 3,2 |
| Taps- og niðurskrivingarprosent í árinum | 0,1 | 0,2 | 0,2 | 0,7 | 0,8 |
| Útlánsvøkstur í árinum | 6,8 | 6,0 | 4,1 | 3,3 | 0,3 |
| Útlán í mun til eginpening | 8,0 | 8,1 | 8,8 | 9,2 | 9,6 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarroknskapartøl | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 69.863 | 66.058 | 65.496 | 70.973 | 72.836 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 1.188 | 1.437 | 1.595 | 1.969 | 2.738 |
| **Vanligar inntøkur tilsamans** | **71.051** | **67.495** | **67.091** | **72.942** | **75.574** |
| | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 51.717 | 50.517 | 50.057 | 49.799 | 50.874 |
| Avskrivingar, ítøkilig ogn | 2.367 | 2.348 | 1.308 | 1.326 | 2.050 |
| Aðrar vanligar útreiðslur | 261 | 400 | 3.222 | 2.565 | 3.620 |
| **Vanligar útreiðslur tilsamans** | **54.345** | **53.265** | **54.587** | **53.690** | **56.544** |
| | | | | | |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **16.706** | **14.230** | **12.504** | **19.252** | **19.030** |
| | | | | | |
| Virðisjavnan | 2.238 | 3.400 | 372 | 3.157 | 1.318 |
| Tap og niðurskrivingar, skuldarar | 3.166 | 3.300 | 4.623 | 10.879 | 14.892 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **15.778** | **14.330** | **8.253** | **11.530** | **5.456** |
| | | | | | |
| Skattur | -1.620 | 0 | -5.400 | 59 | 0 |
| **Ársúrslit** | **17.398** | **14.330** | **13.653** | **11.471** | **5.456** |
| | | | | | |
| Fíggjarstøða | | | | | |
| Útlán | 1.809.286 | 1.694.210 | 1.597.659 | 1.534.990 | 1.485.519 |
| Virðisbrøv | 452.455 | 484.427 | 291.936 | 219.380 | 177.008 |
| Innlán | 2.226.817 | 2.119.321 | 1.973.326 | 1.803.586 | 1.687.822 |
| Javni | 2.494.431 | 2.372.176 | 2.234.244 | 2.024.504 | 1.925.894 |
| Eginpeningur | 227.349 | 209.094 | 193.971 | 175.116 | 161.520 |
| Kapitalgrundarlag | 244.392 | 227.854 | 212.952 | 200.075 | 212.385 |
| Ábyrgdir | 65.876 | 64.963 | 63.556 | 55.583 | 38.251 |

# Leiðslufrágreiðing

## 2017 í stuttum - sparikassans virksemi økist støðugt

- Úrslit eftir skatt var eitt avlop upp á 17,4 mió. kr.
- Renting av eginognini eftir skatt var 8,0 %
- Útlánini øktust 6,8 %
- Innlánini øktust 5,1 %
- Ábyrgdarfæið hækkaði 9,5 %
- Útlánsprosentið 82,8 %
- Gjaldførisyvirdekningurin (§ 152) 168,3 %
- Solvensurin 19,2 %
- Solvenstørvurin 10,3 %

## Virksemi

Sparikassans virksemi er at veita fíggjarligar tænastur til privat og vinnurekandi viðskiftafólk og almennar stovnar um alt landið. Sparikassin ynskir at veita viðskiftafólkum sínum eitt fjølbroytt úrval av fíggjarligum tænastum umframt holla og professionella ráðgeving.

## Búskapargongdin í Føroyum

Føroyski búskapurin hevur seinastu árini verið eyðkendur av stórum vøkstri. Yvirskipað hevur vøksturin í BTÚ í ársins prísum í tíðarskeiðinum 2010-2015 í meðal verið 5,2 % um árið og síðan 2013 hevur búskapurin víst greið tekin upp á hákonjunktur. Hóast tølini fyri 2016 ikki eru tøk, so bendir alt á, at talan verður um sama búskaparvøkstur, sum árið frammanundan og ein meting av BTÚ fyri 2017 bendir á tað sama.

Fleiri orsøkir eru til stóra búskaparvøksturin seinastu árini. Ein orsøk er stóra veiðinøgdin av makreli hjá føroyskum fiskiskipum. Meðan veiðinøgdirnar av vanligu botnfiskasløgunum toski, hýsu og upsa síðan 2010 hava verið í minking, serstakliga í føroyskum sjóøki, er veiðunøgdin av makreli sama tíðarskeið fleirfaldað og hevur ligið omanfyri 100.000 tons í meðal fyri árið. Ein onnur orsøk stavar frá alivinnuni har útflutningsnøgdin av alilaksi er økt munandi seinnu árini, men tað er serliga hækkandi søluprísurin á laksi, sum er høvuðsorsøkin til, at útflutningsvirðið á laksavørum er so nógv vaksið síðan 2013. Ein triðja orsøk til góðu gongdina í føroyska búskapinum er lági oljuprísurin seinnu árini, serliga síðan á heysti 2014, tá prísurin á ráolju fall niður í eina helvt.

Arbeiðsloysið hevur verið lágt og minkandi, ið er greið ábending um, at føroyski búskapurin er í einum hákonjunkturi og tað sama bendir vaksandi talið á løntakarum á. Talið á løntakarum í juli 2017 var 26.728, ið er tað mesta nakrantíð. Góða gongdin í føroyska búskapinum hevur eisini virkað til, at tað síðan 2014 hevur verið nettotilflyting til landið.

Virksemið innan byggivinnuna hevur verið nógv seinnu árini og lutfalsligi parturin av løntakarum innan byggivinnuna er økt síðan summarið 2015, men serliga seinasta árið. Tað sama er galdandi fyri lønargjaldingar í byggivinnuni. Útlitini fyri, at virksemið framvegis verður nógv í byggivinnuni eru til staðar, tá hugsað verður um, at almenni geirin er farin undir stórar verkætlanir og at tørvurin á íbúðum og húsum framvegis ikki er nøktaður, serliga í miðstaðarøkinum.

Omanfyri nevndu viðurskifti við makrelveiðu, laksaprísi og oljuprísi, sum eiga stóran lut í orsøkini til vøksturin í føroyska búskapinum seinnu árini, eru tó viðurskifti, sum vit ikki hava nakra ávirkan á og sum lætt kunnu broytast. Her eru útlit fyri, at stóri búskaparvøksturin, sum hevur verið seinastu árini, minkar nakað, serliga orsakað av, at bæði tøkan av alilaksi og prísurin á alilaksi minkar nakað samstundis sum roknað verður við, at veiðinøgdin av uppisjóvarfiski minkar. Eisini er oljuprísurin hækkaður í seinna hálvári 2017. Roknað verður tó við, at nógva byggivirksemið, sum hevur verið seinnu árini, heldur fram komandi árið.

## Gongdin hjá Norðoya Sparikassa í 2017

Úrslitið eftir skatt í 2017 var eitt avlop á 17,4 mió. kr. í mun til 14,3 mió. kr. í 2016. Hetta er ein øking upp á 3,1 mió. kr. Renting av eginognini eftir skatt varð 8,0 % og eginognin var við árslok uppgjørd til 227 mió. kr.

Úrslitið í 2017 er í høvuðsheitum merkt av, at netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar eru hækkaðar vegna økta virksemið, at virðisjavnin vísti eitt munandi avlop og at peningur varð nýttur til at fríðka uttanumøkið kring høvuðsdeild sparikassans.

Rentustøðið lækkaði enn meiri í 2017 og kappingin um góðu útlánskundarnar er framvegis hørð. Sparikassin hevur sum mál at vera kappingarførur og harvið at vera við í kappingini um kundarnar. Hetta sæst eisini aftur í roknskapinum við lækkandi rentuinntøkum av útlánum og lægri avkasti av gjaldføri sparikassans.

Fyri at tillaga raksturin hevur sparikassin lækkað innlánsrentuna, men meginparturin av hesi tillaging fær ikki fullan virknað fyrr enn í roknskapinum fyri 2018.

Verður sæð burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum, hevði sparikassin eitt avlop av vanligum rakstri í 2017 upp á 16,7 mió. kr. móti 14,2 mió. kr. í 2016.

Í ársfrásøgnini fyri 2016 varð mett at úrslitið av vanligum rakstri í 2017, tá sæð verður burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum, fór at verða eitt avlop upp á umleið 18 mió. kr. Sparikassin kann nú staðfesta, at úrslitið bleiv nakað minni enn roknað varð við, men havandi í huga áður nevndu viðurskifti, sum hava ávirkað roknskapin, er sparikassin samanumtikið væl nøgdur við gongdina í 2017.

## Vaksandi áhugi fyri ábyrgdarpeningi

Norðoya Sparikassi er einasti sjálveigandi sparikassi í Føroyum og letur tí kundunum møguleika at tekna ábyrgdarpening í sparikassanum til serliga góða rentu.

Í 2012 bleiv latið upp fyri at tekna meiri ábyrgdarpening enn gamla markið upp á kr. 20.000. Men ynskir ein ábyrgdari at tekna meiri enn kr. 300.000, skal tað góðkennast av nevndini.

Sparikassans politikkur er, at árliga rentan á ábyrgdarpeningi verður 5 %. Árliga rentan á ábyrgdarpeninginum verður ásett á vanliga umboðsráðsfundi sparikassans. Sparikassin kann víkja frá ásettu rentuni um sparikassans avlop, tøkur tiltakspeningur, ella fíggjarliga støðan annars talar fyri hesum.

Vøksturin seinastu árini bendir á, at ábyrgdarar eru væl nøgdir við rentuna. Sparikassin merkir framvegis stóran áhuga fyri at seta pening í ábyrgdarfæ. Samlaða ábyrgdarfæið var við árslok 2017 kr. 19.806.000, og hevur verið støðugt vaksandi síðan ábyrgdarskipanin varð broytt í 2012.

### Ábyrgdarpeningur




| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ábyrgdarpeningur (tkr.) | 6.795 | 8.182 | 10.727 | 16.470 | 18.091 | 19.806 |
| Vøkstur í indekstølum (2012=100) | 100 | 120 | 158 | 242 | 266 | 291 |

## Norðoya Sparikassi framvegis SIFI-peningastovnur

Vísandi til lóg um fíggjarvirksemi hevur Fíggjareftirlitið tann 26. juni 2017 endurútnevnt Norðoya Sparikassa til SIFI-peningastovn.

Harvið eru serlig krøv áløgd sparikassanum til kapital og gjaldføri v.m., ið skulu tryggja sparikassan uppaftur betri. Danski vinnumálaráðharrin ásetir serligu krøvini til týðandi peningastovnar, og sparikassanum er álagt at hava serliga SIFI kapital verju upp á tilsamans 1,5 % -stig, sum stigvíst kemur í gildi frá 2016 til 2019.

## Strategi 2019

Søgan vísir okkum, at einfaldi setningurin, sum Norðoya Sparikassi hevur sett sær, har dentur verður lagdur á innlán og útlán til privatar og vinnurekandi kundar í Føroyum, gevur okkum eina sterka støðu. Undir fíggjarkreppuni hevði Norðoya Sparikassi heilt natúrliga eitt stutttíðar fokus. Leiðslan metti tó í 2014, at tíðin var búgvin til at meta um menningina hjá sparikassanum við at skoða longur fram í tíðina.

Strategi 2019 er strategiska kós sparikassans við hesari visjón:

### Sjónlig og kundafokuserað

Vit veita eina støðuga, góða tænastu á øllum miðlum og deildum. Kundanøgdsemið er gott, og vit eru tøk, tá ið kundin hevur tørv á okkum.

Sparikassin hevur kundan sum miðdepil við ágrýtnum starvsfólkum, ið fegin veita eina framúr góða tænastu.

Starvsfólkini eru á høgum førleikastigi, veita dygga og álítandi tænastu, eru fyrikomandi og duga at finna loysnir, ið nøkta tørvin hjá kundanum.

Vit hava eitt sjónligt vørumerki og eru kend fyri ábyrgd, trúvirði og sjónligt virksemi í nærumhvørvinum.

Kjarnuvirksemið er at veita fíggjarligar tænastur. Vit hava dugnaligar samstarvsfelagar, har vit í felag koma fram á og menna tænastur, sum geva kundum okkara bestu loysnirnar.

### Vøkstur og økt rakstrarúrslit

Vit eru kappingarfør í prísi og kostnaði. Okkara grundrakstur liggur oman fyri miðal samanborið við peningastovnar á sama stigi.

Vit hava ein útlánsvøkstur á 25 % í mun til 2016, og eginognin hjá sparikassanum er í minsta lagi 250 mió. kr.

### Dugnalig starvsfólk

Vit eru kend sum eitt áhugavekjandi og framsøkið arbeiðspláss. Vit arbeiða støðugt við at tryggja høgt førleika- og útbúgvingarstig. Við okkara menningarsamrøðum tryggja vit, at førleikarnir hjá starvsfólkunum verða gagnnýttir, og ynski teirra vird.

Menningarsamrøðurnar stuðla undir okkara strategi soleiðis, at øll starvsfólk vita, hvør teirra uppgáva er, og hvat ið krevst fyri, at sparikassin kann fremja sína strategi í verki.

Leiðslan vísir eina greiða linju við Strategi 2019 og samskiftir við starvsfólk um mál, úrslit og framdrátt.

Meiri fæst at vita um Strategi 2019 á heimasíðu sparikassans.

# Roknskaparfrágreiðing

## Netto rentuinntøkur

Netto rentuinntøkurnar vóru 60,6 mió. kr. í 2017 í mun til 58,3 mió. kr. í 2016. Tað var ein øking upp á 2,3 mió. kr., ella 4,0 %. Hóast harða kapping um kundarnar og lækkandi rentustøði í 2017, hevur sparikassin megnað at økt um netto rentuinntøkurnar.

## Netto rentu- og kostnaðarinntøkur

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar vóru 69,9 mió. kr. í 2017 í mun til 66,1 mió. kr. í 2016. Tað var ein øking upp á 3,8 mió. kr., ella 5,8 %.

## Virðisjavnan

Virðisjavnin vísir eitt avlop upp á 2,2 mió. kr. fyri 2017 sammett við eitt avlop upp á 3,4 mió. kr. undanfarna ár. Lækkandi rentustøðið í 2017 hevur havt jaliga ávirkan á virðisjavnan av lánsbrøvum, ið vísti eitt avlop upp á 1,7 mió. kr. móti 2,4 mió. kr. árið fyri. Virðisjavnan av partabrøvum var eitt avlop upp á 0,4 mió. kr., meðan virðisjavnan av gjaldoyra og íløguognum góvu eitt avlop upp á tilsamans 0,1 mió. kr.

## Útreiðslur til starvsfólk og umsiting

Samlaðu útreiðslurnar til starvsfólk og umsiting vóru 51,7 mió. kr. í 2017, sum er 1,2 mió. kr. meira enn undanfarna ár. Hesin postur er samansettur av løn til stjórn og starvsfólk, umframt øllum vanligum rakstrarútreiðslum.

Løn og samsýning til umboðsráð, nevnd og stjórn var 3,4 mió. kr. í 2017, sum er 0,3 mió. kr. hægri í mun til árið fyri.

Løn og eftirløn til starvsfólk vóru 24,0 mió. kr. í 2017 móti 23,7 mió. kr. í 2016, sum er ein hækking upp á 0,3 mió. kr. Talið av ársverkum er hækkað við 1,6 - frá 41,5 í 2016 til 43,1 í 2017. Útreiðslur til sosiala trygd øktust við 0,2 mió. kr., frá 3,7 mió. kr. til 3,9 mió. kr.

Útreiðslur til umsiting hækkaðu frá 20,1 mió. kr. í 2016 til 20,4 mió. kr. í 2017. Tað er ein hækking upp á 0,3 mió. kr. Sparikassin arbeiðir miðvíst við at tillaga kostnaðarstøðið til lækkandi rentustøðið.

## Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum

Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum vóru 2,4 mió. í 2017, ið er á sama støði sum árið fyri. Í mun til 2015 eru av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum hækkaðar við uml. 1 mió. kr. um árið. Meginparturin av økingini stavar frá, at sparikassin fríðkar um høvuðssætið í Klaksvík og økið uttanfyri bygningin. Umframt av- og niðurskriving av rakstrargøgnum og fastognum til egna nýtslu, umfatar posturin avskrivingar av innrætting av leigaðum hølum hjá sparikassanum.

## Aðrar rakstrarútreiðslur

Aðrar rakstrarútreiðslur í 2017 vóru 0,3 mió. kr. samanborið við 0,4 mió. kr. árið fyri. Aðrar rakstrarútreiðslur umfata gjald til Garantiformuen (Innskjótaratrygdargrunnur) og útgjald úr gávugrunni sparikassans.

Frá mars 2012 varð gjaldið til Garantiformuen umskipað til eitt fast árligt gjald upp á 0,25 % av dekkaðu netto-innlánunum hjá sparikassanum. Henda skipan var galdandi fram til 2015 og hevur sparikassin einki goldið til Garantiformuen í 2016 og 2017. Framyvir skal sparikassin gjalda eitt munandi lægri gjald eftir nýggjari skipan, ið varð sett í gildi í Føroyum 1. januar 2018.

Árliga ásetur umboðsráð sparikassans eina peningaupphædd, sum verður sett í gávugrunn til almenn gagnlig og vælgerandi endamál. Í 2017 var henda upphædd 0,4 mió. kr. og mælt verður til, at upphæddin verður 0,4 mió. kr. í 2018.

## Avskrivingar og niðurskrivingar upp á skuldarar

Avskrivingar og niðurskrivingar upp á skuldarar vóru 3,2 mió. kr. í 2017, móti 3,3 mió. kr. í 2016, sum er ein lækking upp á 0,1 mió. kr. Saman við góðu búskapargongdini kann sparikassin staðfesta, at miðvísa arbeiðið at minka um kredittváðan og betra um kundagóðskuna hevur eydnast væl. Næsta ár roknar sparikassin við, at niðurskrivingar upp á skuldarar verða á sama støði sum í 2017.

## Kapitalpartar í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum

Sparikassin hevur ikki kapitalpartar í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum.

## Skattur

Við ársbyrjan 2017 hevði sparikassin eitt samlað skattligt hall upp á 109.044 tkr. Verður skattliga avlopið fyri 2017 upp á 16.441 tkr. drigið frá, verður skattliga hallið 92.603 tkr. við árslok 2017. Grundað á varisligar metingar og sannlíkindi fyri, at sparikassin fer at gagnnýta ein part av hesum framførda halli komandi árini, valdi sparikassin í 2015 at taka ein part av útsettu skattaáognini upp á 5.400 tkr. við í roknskapin fyri 2015. Grundað á skattskyldugu inntøkuna seinastu 3 árini hevur sparikassin endurmett virðið av útsettu skattaáognini til í alt 7.020 tkr. í 2017. Sostatt hevur sparikassin inntøkuført útsetta skattaáogn á 1.620 tkr. í 2017.

Sparikassin endurmetur árliga um sannlíkindini fyri, í hvønn mun sparikassin fer at gagnnýta framførda skattliga hallið. Víst verður annars til notu 16 í ársroknskapinum.

## Fíggjarstøða

Fíggjarstøða sparikassans var 2.494 mió. kr. í 2017, í mun til 2.372 mió. kr. í 2016, sum er ein vøkstur upp á 122 mió. kr., ella 5,2 %.

Útlánini hækkaðu við 115 mió. kr. til 1.809 mió. kr. í 2017, sammett við 1.694 mió. kr. í 2016, sum er ein hækking upp á 6,8 %.

Innlánini hækkaðu við 107 mió. kr. til 2.227 mió. kr. í 2017, sammett við 2.119 mió. kr. í 2016, sum er ein hækking upp á 5,1 %.

Í 2011 hevði sparikassin eitt innlánsundirskot upp á 38,6 mió. kr., men í 2012 varð hetta vent til eitt innlánsavlop upp á 158 mió. kr. Innlánsavlopið hevur seinnu árini verið støðugt vaksandi burtursæð frá 2017, har innlánsavlopið lækkaði við 7,6 mió. kr.

## Innlánsavlop




| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Innlánsavlop (tkr.) | 158.017 | 202.303 | 268.596 | 375.667 | 425.111 | 417.531 |
| Vøkstur í indekstølum (2012=100) | 100 | 128 | 170 | 238 | 269 | 264 |

Broytingar í muninum millum innlán og útlán ávirka eisini útlánsprosentið, sum í 2017 hækkaði við 1,3 % -stigum til 82,8 % í mun til 81,5 % árið fyri.

Sparikassin hevur seinastu árini havt sum mál at økja um innlánsavlopið og harvið minka um útlánsprosentið. Við árslok 2016 varð mett, at bæði innlánsavlop og útlánsprosent vóru á einum hóskandi støði og at málsetningurin var náddur. Gjaldførið varð enn meiri styrkt og tí kundi sparikassin kappast um kundarnar á einum sunnum grundarlagi. Grundað á sparikassans útlánsvøkstur í 2017 er innlánsavlopið eitt vet lægri og útlánsprosentið eitt vet hægri. Tó metir sparikassin, at innlánsavlop og útlánsprosent framhaldandi eru á hóskandi støði.

Skyldur, ið ikki eru førdar í fíggjarstøðuna, øktust í 2017 til 65,9 mió. kr. frá 65 mió. kr. í 2016, sum er ein øking upp á 0,9 mió. kr.

### Eftirstillað kapitalinnskot

Í sambandi við afturrindan av hybridum kjarnukapitali frá statinum á tilsamans 50,6 mió. kr. í 2013 og 2014, vórðu 25,5 mió. kr. fíggjaðar við 10-ára ábyrgdarláni frá føroyskum íleggjarum til eina lægri rentu. Víst verður til notu 20 í ársfrágreiðingini.

### Gjaldføri

Gjaldførið hjá sparikassanum er gott. Yvirdekningurin í mun til lógarkravið sambært § 152 er uppgjørdur til 168,3 % við árslok 2017 í mun til 176,1 % við árslok 2016. Sparikassin skal haraftrat sum SIFI peningastovnur hava eitt LCR lyklatal á minst 100 %. LCR lyklatalið var við árslok 2017 uppgjørt til 397 % móti 209 % við árslok 2016.

### Eftirlitsdiamanturin

Fíggjareftirlitið setti í 2012 í gildi ein sokallaðan eftirlitsdiamant. Har verða nevnd fimm ávaringartekin, sum kunnu geva ábendingar um, at ein peningastovnur hevur ov høgan váða. Niðanfyri er yvirlit yvir sparikassans váða í mun til hesi ávaringartekin.

| Ávaringartekin | Markvirði | Norðoya Sparikassi |
|---|---|---|
| Stórir kundar tilsamans | < 125 % | 41,4 % |
| Útlánsvøkstur | < 20 % | 6,8 % |
| Útlán til fastognir | < 25 % | 8,0 % |
| Fíggingarlutfall | < 1 | 0,7 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | > 50 % | 168,3 % |

Samanumtikið er sparikassin væl innanfyri hesi fimm ávaringartekin.

### Góð virkisleiðsla

Sparikassin vil eftir besta førimuni fylgja tilmælinum um góða virkisleiðslu, umframt at fylgja tilmælinum frá Finans Danmark um leiðreglur fyri leiðslu við serligum atliti til peningastovnar. Víst verður til frágreiðing um góða virkisleiðslu á heimasíðu sparikassans.

### Solvensur og kapitalviðurskifti

Kapitalgrundarlag sparikassans, eftir at avlopið fyri 2017 er lagt afturat, er 244,4 mió. kr.

Solvensur sparikassans við árslok 2017 er uppgjørdur til 19,2 % móti 19,1 % við árslok 2016.

Umframt at gera upp lógarkravda solvensin skal sparikassin gera upp ein individuellan solvenstørv, sum við árslok 2017 er uppgjørdur til 10,3 % móti 9,3 % við árslok 2016. Hækkingin stendst av øktari avseting upp á kredittváða og operationellan váða.

Munurin millum solvens og solvenstørv er 8,9 % -stig, svarandi til ein solvensyvirdekning upp á 86,1 %. Hetta er eitt mát, sum javnan verður nýtt, tá metast skal um mótstøðuføri móti komandi tapum hjá einum peningastovni.

Sparikassin metir javnan um grundarlagið, mannagongdina og fyritreytirnar, sum eru grundarlagið undir uppgerðini.

Leiðslan metir at solvensur sparikassans er nøktandi til tess at dekka tann váða, ið stendst av virksemi sparikassans. Nærri er greitt frá um hesi viðurskifti í sparikassans váðafrágreiðing 2017.

## Komandi kapitalkrøv

Nýggj reglugerð um uppgerð av kapitali og kapitaltørvi, vanliga nevnd CRR/CRD-IV, varð sett í gildi 1. juli 2015. Eisini varð lógin um SIFI peningastovnar sett í gildi fyri Føroyar. Hesi lógarkrøv hava millum annað við sær herd krøv til uppgerð av kapitali og kapitaltørvi, og verða hesi stigvíst tikin í nýtslu frá 2016 til 2019.

Í stuttum kann sigast, at sambært CRD-IV skulu allir peningastovnar hava eina eyka kapitalverju upp á 2,5 %-stig, umframt at sparikassin sum SIFI peningastovnur skal hava eina eyka SIFI-kapitalverju upp á 1,5 %-stig.

Í mai 2017 boðaði danski vinnumálaráðharrin frá, at ein systemisk kapitalverja á 1 % varð ásett fyri allar føroyskar eksponeringar frá 1. januar 2018. Ásetingin er grundað á tilmæli frá Det Systemiske Risikoråd, sum hevur greinað bygnaðin í føroyska búskapinum og samanspælið við fíggjargeiran í Føroyum. Staðfest verður, at føroyski búskapurin í stóran mun er tengdur at gongdini í fiski- og alivinnu, og tískil kunnu óvæntaðir fíggjarligir smeitir í hesum vinnugreinum hava stóra ávirkan á føroyska fíggjargeiran.

Samanlagt verður hesin eyka kapitaltørvur upp á 5 %-stig lagdur omaná tann individuella kapitaltørvin. Eisini er møguligt at áleggja øllum peningastovnum eina eyka konjunktur kapitalverju upp til 2,5 %-stig, um útlánsvøksturin í fíggjargeiranum verður ov stórur.

Haraftrat eru nýggj kapitalkrøv (NEP-krøv) ávegis, ið skulu fyribyrgja, at innskjótarar missa pening, um peningastovnar koma í fíggjarligt óføri. Peningastovnar skulu vera so mikið væl bjálvaðir, at nóg mikið av kapitali er til at dekka tap og til rekapitalisering, um peningastovnurin verður neyðlíðandi og skal umskipast ella avviklast. NEP-krøvini, sum fáa gildi frá 1. januar 2019, verða stigvíst tikin í nýtslu frá 2019-2023.

Við støði í hesum verður staðfest, at krøvini til solvens og gjaldføri verða alsamt størri komandi árini. Hóast endaligu NEP krøvini ikki eru ásett verður mett, at sparikassin hevur nøktandi solvens og gjaldføri til at dekka tann váða, ið stendst av virksemi sparikassans frameftir.

## Grannskoðaranevnd

Nevnd sparikassans hevur valt eina sjálvstøðuga grannskoðaranevnd, ið er mannað við 3 limum, og eru teir:
John P. Danielsen, Jóannes Hansen og Petur Alberg Lamhauge.

Nevndin hevur eisini innstillað John P. Danielsen sum roknskaparkønan í grannskoðaranevndini sambært ásetingunum í kunngerðini.

Nevnd sparikassans hevur góðkent arbeiðssetning og arbeiðsætlan hjá grannskoðaranevndini.

Arbeiðið hjá grannskoðaranevndini fevnir millum annað um at fylgja við:

- arbeiðinum at gera roknskap
- um sparikassans innaneftirlit og váðastýring eru á einum nøktandi støði
- arbeiðinum hjá grannskoðanini

Grannskoðaranevndin hevur 2-3 fundir árliga og innstillar til nevndina.

## Váðanevnd

Váðanevndin er mannað við øllum nevndarlimum sparikassans. John P. Danielsen er formaður í váðanevndini.

## Lønarnevnd

Lønarnevndin er mannað við øllum nevndarlimum sparikassans.

## Málsetningur fyri undirumboðaða kynið í nevndini

Málsetningur sparikassans er, at kynsbýtið millum umboðsráðsvaldu nevndarlimirnar í 2020 verður soleiðis, at í minsta lagi 1/3 av umboðsráðsvaldu nevndarlimunum er umboðaður av hvørjum kyni. Tó skal gerast vart við, at sparikassin raðfestir førleikar hjá nevndarlimum framum ætlanina at røkka málsetninginum fyri undirumboðaða kynið. Nevnd sparikassans telur 6 umboðsráðsvaldar limir - fimm menn og eina kvinnu.

## Óvissur í sambandi við virðisáseting

Arbeitt verður støðugt við at betra og menna nýggjar arbeiðshættir til hesar virðisásetingar, og sparikassin metir, at óvissan er á einum støði, sum ikki hevur stóran týdning í sambandi við roknskapin. Størstu óvissurnar í sambandi við virðisáseting eru knýttar at niðurskrivingum av útlánum, burturleggingum upp á ábyrgdir, avsetingum móti skyldum og virðisáseting av ognum.

## Óvanlig viðurskifti

Tað eru ongi óvanlig viðurskifti í 2017, sum hava havt ávirkan á virðisáseting og metingar sparikassans.

## Týðandi hendingar eftir roknskaparlok

Tá henda ársfrásøgn verður almannakunngjørd, er roknskaparstandardurin IFRS 9 settur í gildi við virknaði frá 1. januar 2018. Roknskaparstandardurin IFRS 9 umfatar munandi broytingar til galdandi niðurskrivingarreglur eins og reglur fyri bólking og virðisáseting av fíggjarligum ognum.

Yvirskipaðu broytingarnar í IFRS 9 eru settar í verk gjøgnum roknskaparkunngerðina fyri føroyskar peningastovnar og eru galdandi fyri roknskapartíðarskeið, ið byrja 1. januar 2018.

Broyttu reglurnar fyri bólking og virðisáseting av fíggjarligum ognum væntast ikki at broytast munandi sammett við tær meginreglur fyri virðisáseting, ið nýttar eru í sambandi við ársroknskapin fyri 2017.

Ávirkanin av nýggju niðurskrivingarreglunum væntast at vera 3-4 mió. kr., sum verða fult innroknaðar í byrjanarfíggjarstøðuna pr. 1. januar 2018.

Fyri nærri kunning um IFRS 9 verður víst til notu 1 "Nýttur roknskaparháttur".

## Meting um 2018

Lága rentustøðið leggur trýst á inntøkurnar, men við tillagingum av rakstrinum ætlar sparikassin framvegis at vera kappingarførur.

Um sæð verður burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum upp á útlán, verður talan um avlop av vanligum rakstri upp á umleið 20 mió. kr.

Virðisjavnan og niðurskrivingar upp á útlán væntast at tyngja raksturin við umleið 6 mió. kr. og sostatt væntar sparikassin, at úrslitið áðrenn skatt verður eitt avlop á umleið 14 mió. kr.

# Váðar og váðastýring

Tað áliggur nevnd sparikassans at tryggja, at sparikassin hevur eina vælvirkandi váðastýring, soleiðis at allir týðandi váðar verða eyðmerktir og hóskandi skipanir eru til váðastýring. Harafturat skulu váðapolitikkir og váðakarmar fastleggjast.

Váðaábyrgdarhavandi hevur vegna stjórnina eftirlit við váðastýringini í sparikassanum. Uppgávan hjá váðaábyrgdarhavandi er at tryggja, at váðastýringin er nøktandi og at leiðslan hevur eina greiða mynd av samlaða váða sparikassans.

Sum partur av regluligu kunningini til nevndina verður váðafrágreiðing viðvíkjandi teimum týðandi váðaøkjunum løgd fyri nevndina hvønn ársfjórðing. Harumframt verður váðafrágreiðing frá váðaábyrgdarhavandi løgd fyri nevndina einaferð um árið. Tað áliggur stjórnini og váðaábyrgdarhavandi at tryggja, at nøktandi innanhýsis mannagongdir eru í samband við máting og stýring av váða. Í sparikassanum er skilnaður ímillum eindirnar, sum avgreiða, og tær sum hava eftirlit.

Rakstur av peningastovnsvirksemi ber við sær, at sparikassin átekur sær nakrar serligar váðar, herundir kredittváðar, marknaðarváðar, gjaldførisváðar og operationellar váðar. Hesir váðar, sum eru lýstir niðanfyri, sýnir sparikassin serligan ans í dagliga virki sínum, tí endamálið við sparikassans politikkum er at avmarka tey tap, sum millum annað kunnu standast av óvæntaðari gongd á fíggjarmarknaðunum.

Talan kann verða um aðrar váðar, umframt teir sum eru lýstir her, ið kunnu hava ávirkan á framhaldandi rakstur og menning av sparikassanum. Leiðslan metir tó, at teir lýstu váðarnir, eru teir mest týðandi. Endamálið við hesum upplýsingum um váðar og váðastýring er at geva teimum, sum hava áhugamál í sparikassanum betri møguleika at meta um váðaprofil og kapitaltørv sparikassans.

### Kredittváði

Kredittváði merkir, at vandi er fyri fíggjarligum tapi, um kundin ikki er førur fyri at halda sínar fíggjarligu skyldir mótvegis sparikassanum.

Sparikassin leggur í sínum kredittpolitikki og kredittstýring herðslu á, at hvørki einstøk tap ella fleiri samlað tap innan ávísar vinnugreinar skulu kunna gerast so stór, at hesi í síðsta enda kunnu hava álvarsligar fylgjur fyri solvensin. Tí arbeiðir sparikassin áhaldandi við at betra um góðskuna av kredittum og at avmarka kredittváðan bæði samlað sæð og innan ávísar vinnugreinar. Sparikassin metir, at kredittváðin er á einum nøktandi varisligum støði, sum er í samsvari við sparikassans kredittpolitikk.

Sambært galdandi kredittpolitikki kunnu vinnulán og ábyrgdir í mesta lagi vera 40 % av samlaða kredittváða sparikassans. Ásett eru eisini ítøkilig mørk viðvíkjandi einstøku vinnugreinunum.

Landafrøðiliga spjaðingin av útlánsvirksemi sparikassans er í dag soleiðis, at kundagrundarlagið fevnir í størstan mun um Norðoyggjar, Eysturoy og Suðurstreymoy - tað vil siga í teimum økjum, har sparikassin hevur deildir.

Sparikassin hevur síðani 2013 havt útlánsvøkstur og í 2017 øktust útlánini við 6,8 %. Størsti parturin av økingini var útlán til privatkundar. Vanliga verður mett, at stórur vøkstur viðførir at dygdin í kredittviðgerðini versnar. Sparikassin ynskir ikki ov stóran vøkstur, men metir, at vøkstur upp á í mesta lagi 7 % er hóskandi fyri sparikassan.

Ein bólkur av sínámillum samanhangandi kundum verður roknaður sum ein eksponering sambært CRR art. 4. Um eksponeringin eftir frádrátt er 10 % av kapitalgrundarlagnum, verður tað roknað sum ein stór eksponering.

Eftirlitsdiamanturin hjá Fíggjareftirlitinum ásetur, at stórar eksponeringar tilsamans ikki skulu verða størri enn 125 % av kapitalgrundarlagnum.

Við støði í kapitalgrundarlagi sparikassans við ársenda 2017, sum var kr. 244,4 mió. kr. verður ein eksponering roknað sum ein stór eksponering, um hon er kr. 24,4 mió. kr. ella størri. Stóru eksponeringarnar tilsamans í 2017 vóru uppgjørdar til 41,4 %

av kapitalgrundarlagnum, sum sparikassin metir vera nøktandi. Sparikassin ynskir ikki, at lutfallið millum stóru eksponeringarnar tilsamans í mun til kapitalgrundarlagið økist.

Frá 1. januar 2018 er ein broyting í ávaringartekninum í eftirlitsdiamantinum viðvíkjandi stórum eksponeringum sett í gildi. Hereftir kunnu 20 tær størstu eksponeringarnar, aftaná ávísar frádráttir, í mesta lagi vera 175 % af kjarnukapitalinum. Eksponeringar mótvegis almennum stovnum verða ikki roknaðar uppí.

Sparikassin hevur uppgjørt hetta lyklatal til 146,4 % við ársenda 2017. Sparikassin metir, at mest hóskandi er, at lyklatalið er í mesta lagi 150 % og væntar sparikassin, at lyklatalið verður á sama støði við ársenda 2018.

## Kredittviðgerðin

Kredittdeildin hevur yvirskipaðu ábyrgdina av kredittveitingini. Leiðslan ásannar, at kredittdeildin er ein sera týðandi partur í váðastýringini og kredittviðgerðini. Uppgávan hjá kredittdeildini er at hava eftirlit við kredittviðgerðini og játtanarmannagongdum í sparikassanum. Kredittdeildin er við í játtanini av størri eksponeringum eins og í meira truplum málum. Harumframt skipar kredittdeildin fyri, at allar eksponeringar verða gjøgnumgingnar í minsta lagi einaferð árliga. Gjøgnumgongdin umfatar m.a. greining av gjaldsevni og fíggjarstøðu kundans. Sparikassin ásetur við støði í framdu greiningunum karakter á hvørja einstaka eksponering, samsvarandi karakterstiga Fíggjareftirlitisins. Karaktergevingin gevur leiðsluni eina mynd av góðskuni hjá kundum sparikassans sum heild, og tryggjar eyðmerking av veikum eksponeringum.

Kredittdeildin skal somuleiðis tryggja, at málsetningar og ásetingar í kredittpolitikkinum verða fylgdar, herundir at neyðug orka er avsett til eina effektiva viðgerð av truplum eksponeringum. Hetta er fyri at avmarka tapsvandan. Regluligar kredittfrágreiðingar verða latnar nevnd sparikassans. Hetta er ætlað sum amboð hjá nevndini at eyðmerkja og stýra kredittváða sparikassans, sum umrøtt omanfyri.

Sparikassin metir, í minsta lagi hvønn ársfjórðing, um tørvin á niðurskriving av einstøkum útlánum og av niðurskriving upp á bólkar av útlánum við felags váðaeyðkennum. Somuleiðis verður hvønn ársfjórðing mett um tørvin at gera burturleggingar upp á ábyrgdir. Bólkaniðurskrivingin verður roknað eftir myndli, sum er mentur av Lokale Pengeinstitutter, ið er ein felagsskapur av peningastovnum í Danmark og Føroyum, sum sparikassin er limur í.

Frá 1. januar 2018 eru nýggjar niðurskrivingarreglur settar í gildi, ið taka støði í altjóða roknskaparstandardinum IFRS 9. Við IFRS 9 verða galdandi niðurskrivingarreglur, ið eru grundaðar á staðfest tap, broyttar til at taka støði í væntaðum tapum. Víst verður til notu 1, nýttur roknskaparháttur, fyri nærri kunning viðvíkjandi komandi roknskaparreglum.

## Marknaðarváði

Marknaðarváði er at rokna sum váðin fyri, at marknaðarvirðið av sparikassans aktivum og passivum ávirkast av broytingum í marknaðarviðurskiftum.

Marknaðarváði fevnir um rentu-, gjaldoyra- og partabrævaváða.

## Rentuváði

Rentuváði er váðin, sum sparikassin hevur í sambandi við rentubroytingar á fíggjarmarknaðunum. Upphæddin, sum upplýst er í roknskapinum sum rentuváði, er kurstap, sum sparikassin fær, um rentustøðið hækkar 1 %-stig. Sambært politikki sparikassans viðvíkjandi marknaðarváða, skal rentuváðin tilsamans ikki fara upp um 5 % av kjarnukapitalinum.

Við ársenda 2017 var rentuváðin 3,8 mió. kr., ið svarar til 1,7 % av kjarnukapitalinum.

## Partabrævaváði

Partabrævaváði er váðin, sum sparikassin hevur í sambandi við broytingar í partabrævakursum.

Partabrævaíløgur fevna um børsskrásett partabrøv, óskrásett partabrøv og kapitalpartar í tilknýttum og assosieraðum fyritøkum.

Sambært politikki sparikassans viðvíkjandi marknaðarváða skal virðið á goymsluni av skrásettum partabrøvum ikki fara upp um 5 % av kjarnukapitalinum.

Sparikassin hevur eingi børsskrásett partabrøv ella kapitalpartar í tilknýttum og assosieraðum fyritøkum. Sparikassin eigur bert sektorpartabrøv, sum eru partabrøv í fyritøkum, sum sparikassin samstarvar við. Við ársenda 2017 var virðið av sektorpartabrøvum 12,3 mió. kr.

## Gjaldoyraváði

Gjaldoyraváði er váðin, sum sparikassin hevur í sambandi við broytingar í gjaldoyrakursum.

Gjaldoyraváðin, sum verður roknaður út sum størsta virði av ávikavist positiónum í gjaldoyra, har sparikassin hevur eina nettoogn, og gjaldoyra, har sparikassin hevur eina nettoskuld, skal ikki fara upp um 5 % av kjarnukapitalinum.

Gjaldoyraváðin hjá sparikassanum er í høvuðsheitum goymsla av kontantum gjaldoyra. Sparikassin hevur altíð eina hóskandi nøgd í ávísum gjaldoyrum í sambandi við kontantan handil við viðskiftafólk.

Gjaldoyrastøða sparikassans, sum er upplýst undir lyklatølunum, var 0,7 við ársenda 2017.

## Gjaldførisváði

Gjaldførisváði er váðin fyri, at sparikassin ikki er mentur at halda gjaldsskyldur sínar, um gjaldførið ikki er nøktandi. Somuleiðis kann vandi vera fyri, at útvegan av gjaldføri gerst meira kostnaðarmikið, enn roknað verður við. Sparikassin leggur í stýringini av gjaldførisváðanum herðslu á at tryggja eitt gott gjaldføri bæði í mun til stuttfreistaðar og langfreistaðar skyldur, og at fíggingarkostnaðurin er rímiligur.

Galdandi lóg ásetur sambært § 152 minstukrøv til gjaldføri sparikassans, og harafturat ásetur eftirlitsdiamanturin eitt mark, sum er 50 % størri enn lógarkravið. Sparikassin ásetur sjálvur eitt innanhýsis krav til gjaldførið, sum er 100 % omanfyri lógarkravið og harvið munandi hægri enn minstukrøvini sambært lógini og eftirlitsdiamantinum. Við ársenda 2017 var yvirdekningurin í mun til minstakrav lógarinnar 168,3 %.

Liquidity Coverage Ratio (LCR) er eitt minstakrav til nøgdina av gjaldføri í mun til gjaldføristørvin næstu 30 dagarnar í einari støðu við bráðfeingis gjaldføristørvi. LCR kravið økist í stigum frá 60 % til 100 % frá 1. oktober 2015 til 1. januar 2018. Tó skal sparikassin sum SIFI peningastovnur lúka LCR kravið á 100 %. Sparikassin ásetur sjálvur eitt innanhýsis krav til LCR, sum er 20 %-stig yvir lógarinnar kravi. Við ársenda 2017 hevði sparikassin eitt LCR lyklatal á 397 %. LCR væntast at verða sett í gildi í Føroyum í 2018.

Sparikassin fylgir neyvt við gongdini í gjaldførinum, soleiðis at neyðug stig kunnu takast um óvæntaðar broytingar koma fyri. Sparikassin hevur eina ætlan við ítøkiligum tiltøkum, sum kunnu setast í verk, um gjaldførið fer niður um innanhýsis ásetta markið. Nevnd og stjórn fáa mánaðarliga uppgerð yvir gjaldførisstøðu sparikassans.

## Operationellur váði

Hetta er váði í sambandi við tap, sum kunnu koma beinleiðis ella óbeinleiðis av manglandi ella skeivum innanhýsis mannagongdum, menniskjaligum mistøkum, feilum í skipanum ella av uttanífrá komandi hendingum. Somuleiðis er váði í sambandi við umdømi sparikassans umfatað av operatiónella váðanum.

Sparikassin stýrir hesum váða við virkisgongdum og innanhýsis eftirliti. Virkisgongdirnar verða javnan endurskoðaðar og broyttar um neyðugt, umframt at nýggjar verða mentar eftir tørvi. Sparikassin avsetur neyðuga orku til eftirlit, og verða eftirlitsuppgávurnar framdar av starvsfólki, sum fyriskipanarliga eru óheft av teimum, sum avgreiða.

# Leiðsluátekning

Vit hava í dag viðgjørt og góðtikið ársfrásøgnina fyri 2017 hjá Norðoya Sparikassa.

Ársfrásøgnin er greidd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi, herundir roknskaparkunngerð frá Fíggjareftirlitinum um fíggjarligar frásagnir hjá kredittstovnum v.m.

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av sparikassans ognum, skyldum og fíggjarstøðu við ársenda og úrslitinum fyri 2017.

Somuleiðis er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rætta frágreiðing um gongdina í virksemi sparikassans og fíggjarligu støðu, umframt eina frágreiðing av teimum mest týdningarmiklu váðum og óvissum, ið sparikassin kann verða ávirkaður av.

Ársfrásøgnin verður viðmælt umboðsráðsfundinum at góðkenna.

Klaksvík, 12. apríl 2018.

Stjórn

Marner Mortensen

Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| John P. Danielsen<br>formaður | Jóannes Hansen<br>næstformaður | Jóhanna á Tjaldrafløtti |
| Karl Heri Joensen | Petur Alberg Lamhauge | Frimodt Rasmussen |
| Guðrið Lava Olsen | Tummas Martin Sólsker | Janus Joensen |

Umboðsráðsfundur

Góðkend á umboðsráðsfundi tann 26. apríl 2018

Niels Winther Poulsen, adv.
fundarstjóri

# Váttanir frá óheftum grannskoðarum

Til umboðsráðslimirnar í Norðoya Sparikassa

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu sparikassans tann 31. desember 2017, umframt av úrsliti av sparikassans virksemi fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2017 í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi, herundir kunngerð um fíggjarligar frásagnir fyri fíggjarstovnar.

## Hvat hava vit grannskoðað

Ársroknskapin hjá Norðoya Sparikassa fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2017 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum, herundir nýttum roknskaparhátti fyri sparikassan.

## Grundarlag fyri niðurstøðu

Vit hava grannskoðað í samsvari við altjóða standardum um grannskoðan og øðrum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd er, sambært hesum standardum og krøvum, nærri lýst í partinum í grannskoðanarváttanini "Ábyrgd grannskoðarans fyri grannskoðanini av ársroknskapinum".

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

## Óheftni

Vit eru óheftir av sparikassanum samsvarandi altjóða etiskum krøvum fyri grannskoðan (IESBA) og øðrum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum, eins og vit fylgja øðrum av okkara skyldum samsvarandi hesum ásetingum og krøvum.

## Umrøða av leiðslufrágreiðingini

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin umfatar ikki leiðslufrágreiðingina, og vit gera ikki niðurstøðu við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Sum lið í grannskoðan av ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at meta, um týðandi ósamsvar er millum leiðslufrágreiðing og ársroknskap ella ta vitan, vit hava fingið undir grannskoðanini, ella um hon á annan hátt kann haldast at innihalda misvísandi kunning.

Tað er eisini okkara ábyrgd at meta um, hvørt leiðslufrágreiðingin hevur tær upplýsingar, ið krevjast sambært lóg um fíggjarligt virksemi.

Grundað á tað arbeiði, vit hava gjørt, er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við krøvini í lógini um fíggjarligt virksemi. Vit hava ikki funnið týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi og kunngerð um fíggjarligar frásagnir fyri fíggjarstovnar. Leiðslan hevur somuleiðis ábyrgd av tí innanhýsis eftirliti, sum leiðslan metir er neyðugt, fyri at ein ársroknskapur kann gerast uttan týðandi skeivleikar og uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapur verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgd av at meta um evnini hjá sparikassanum at halda fram við rakstrinum; har hetta er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti, ið hava týdning fyri framhaldandi rakstur; og at gera ársroknskapin við støði í roknskaparligu meginregluni um framhaldandi rakstur, um hon ikki ætlar at taka sparikassan av, gevast við rakstrinum ella ikki hevur aðrar realistiskar møguleikar enn at gevast.

## Ábyrgd grannskoðarans fyri grannskoðan av ársroknskapinum

Okkara mál er at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum, uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarváttan við niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum støði, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan gjørd í samsvari við altjóða standardum um grannskoðan og øðrum krøvum, ið eru galdandi í Føroyum, altíð vil avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir finnast. Skeivleikar kunnu standast av sviki ella mistøkum, og kunnu vera týðandi, um tað er rímiligt at halda, at teir hvør sær ella samanlagt ávirkað fíggjarligar avgerðir, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum lið í grannskoðan, gjørd í samsvari við altjóða standard um grannskoðan og onnur krøv, ið galda í Føroyum, gera vit fakligar metingar og varðveita undir grannskoðanini professionelt skepsis. Harumframt:

- Ávísa vit og meta um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Við grundarlagi í tí váða, ið kemur fram undir okkara kanning, verður grannskoðanin framd fyri at fáa nøktandi grannskoðanarprógv, ið eru egnað at vera grundarlag fyri okkara niðurstøðu. Vandin fyri at týðandi skeivleikar, ið standast av sviki, ikki verða uppdagaðir, er størri enn vandin fyri, at skeivleikar, ið standast av feilum ikki verða uppdagaðir, tí svik kann umfata samansvørjingar, skjalafalsan, at okkurt verður dult, villleiðing ella brot á reglur um innanhýsis eftirlit.

- Seta vit okkum inn í innanhýsis eftirlitið, sum hevur týdning fyri grannskoðanina, fyri at vit undir grannskoðanini kunnu gera tað, sum eftir umstøðunum er passandi, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um, hvussu effektivt innanhýsis eftirlitið hjá sparikassanum er.

- Taka vit støðu til, um roknskaparhátturin, ið leiðslan hevur nýtt, er hóskandi, og um roknskaparligu metingarnar og atknýttu upplýsingarnar, ið leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Gera vit eina niðurstøðu um, hvørt ársroknskapurin gjørdur av leiðsluni við grundarlagi í roknskaparligu meginregluni um framhaldandi rakstur er hóskandi, og um tað við grundarlagi í tí grannskoðanarprógvi, vit hava fingið, eru týðandi óvissur knýttar at hendingum ella viðurskiftum, sum kunnu skapa týðandi óvissu um sparikassans evni til at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða verður, at tað eru týðandi óvissur, skulu vit í okkara átekning gera vart við upplýsingar um hetta í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøða er grundað á tað grannskoðanarprógv, vit hava fingið til vega fram til dagfestingina av okkara grannskoðanarátekning. Framtíðar hendingar ella viðurskifti kunnu tó hava við sær, at sparikassin ikki longur kann halda fram við sínum virksemi.

- Taka vit støðu til ta samlaðu framløguna, strukturin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir notur, og um ársroknskapurin endurspeglar tær undirliggjandi flytingar og hendingar soleiðis, at tað er tann rættvísandi myndin, ið kemur fram.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað ætlaða vavið av grannskoðanini, nær hon verður gjørd, og um týðandi viðurskifti vit koma fram á undir grannskoðanini, herundir møguligar týðandi veikleikar í innanhýsis eftirlitinum.

Vit vátta fyri ovastu leiðsluni, at vit lúka viðkomandi etisk krøv um óheftni og upplýsa um øll viðurskifti, sum rímiliga kunnu hugsast at ávirka okkara óheftu støðu og, har hetta er viðkomandi, tilhoyrandi trygdarfyriskipanir.

Tórshavn, tann 12. apríl 2018

NUMO Sp/f,
Góðkent grannskoðanarvirki

Símun Absalonsen
Løggildur grannskoðari

# Rakstrarroknskapur

| Nota | | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 2 | Rentuinntøkur o.a. | 66.539 | 67.915 |
| 3 | Rentuútreiðslur o.a. | 5.921 | 9.608 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **60.618** | **58.307** |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 0 | 0 |
| 4 | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 9.817 | 8.169 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 572 | 418 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **69.863** | **66.058** |
| 5 | Virðisjavnan av lánsbrøvum, partabrøvum, gjaldoyra o.ø. | 2.238 | 3.400 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 1.188 | 1.437 |
| 6 | Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 51.717 | 50.517 |
| 7 | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 2.367 | 2.348 |
| 8 | Aðrar rakstrarútreiðslur | 261 | 400 |
| 9 | Avskrivingar og niðurskrivingar upp á skuldarar, netto | 3.166 | 3.300 |
| | **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **15.778** | **14.330** |
| 10 | Skattur | -1.620 | 0 |
| | **Ársúrslit** | **17.398** | **14.330** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **Býti av ársúrsliti** | | |
| | Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 966 | 857 |
| | Lagt í gávugrunnin | 400 | 400 |
| | Flutt til næsta ár | 16.032 | 13.073 |
| | **Tilsamans** | **17.398** | **14.330** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| Nota | | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 56.377 | 54.114 |
| 11 | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 122.609 | 81.920 |
| 12 | Útlán til amortiserað kostvirði | 1.809.286 | 1.694.210 |
| 13 | Lánsbrøv til dagsvirði | 440.125 | 462.048 |
| 13 | Lánsbrøv til amortiseraðan kostprís | 0 | 10.054 |
| 14 | Partabrøv o.a. | 12.330 | 12.325 |
| 15 | Fastognir tilsamans | 23.694 | 23.284 |
| | Íløguognir | 8.640 | 8.521 |
| | Fastognir til egna nýtslu | 15.054 | 14.763 |
| 15 | Aðrar materiellar ognir | 7.810 | 8.017 |
| 16 | Útsett skattaáogn | 7.020 | 5.400 |
| | Yvirtiknar ognir | 8.878 | 9.262 |
| 17 | Aðrar ognir | 6.302 | 11.542 |
| | Tíðaravmarkingar | 0 | 0 |
| | **Ogn tilsamans** | **2.494.431** | **2.372.176** |

| Nota | | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Skuld og eginpeningur** | | |
| | | | |
| | **Skuld** | | |
| 18 | Skuld til peningastovnar | 21 | 0 |
| 19 | Innlán | 2.226.817 | 2.119.321 |
| | Onnur skuld | 12.526 | 15.861 |
| | Tíðaravmarkingar | 283 | 282 |
| | **Skuld tilsamans** | **2.239.647** | **2.135.464** |
| | | | |
| | **Avsetingar** | | |
| | Avsetingar til eftirløn o.a. | 1.935 | 2.025 |
| | Avsetingar til tap upp á ábyrgdir | 0 | 93 |
| | Aðrar avsetingar | 0 | 0 |
| | **Avsetingar tilsamans** | **1.935** | **2.118** |
| | | | |
| 20 | **Eftirstillað kapitalinnskot** | **25.500** | **25.500** |
| | | | |
| | **Eginpeningur** | | |
| 21 | Ábyrgdarpeningur | 19.806 | 18.091 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 190.145 | 176.673 |
| | Flutt frá ársúrsliti | 16.032 | 13.073 |
| | Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 966 | 857 |
| | Gávugrunnur | 400 | 400 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **227.349** | **209.094** |
| | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.494.431** | **2.372.176** |

# Útgreining av eginpeningi

| | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---:|---:|
| **Kapitalflytingar** | | |
| Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 18.091 | 16.470 |
| Tilgongd í árinum | 1.824 | 1.896 |
| Frágongd í árinum | -109 | -275 |
| **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **19.806** | **18.091** |
| | | |
| Flutt avlop við ársbyrjan | 189.746 | 176.271 |
| Flutt frá gávugrunni | 400 | 400 |
| Flutt frá ársúrsliti | 16.032 | 13.073 |
| Regulering renta av ábyrgdarpeningi undanfarið ár | 0 | 2 |
| **Flutt avlop við ársenda** | **206.177** | **189.746** |
| | | |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 966 | 857 |
| | | |
| **Gávugrunnur** | | |
| Gávugrunnur við ársbyrjan | 400 | 400 |
| Brúkt í árinum | -261 | -400 |
| Flutt frá býti av ársúrsliti | 139 | 400 |
| **Gávugrunnur við ársenda** | **400** | **400** |
| | | |
| Eginpeningur tilsamans | 227.349 | 209.094 |

# Kapital- og solvensuppgerð

| | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|
| Eginpeningur | 227.349 | 209.094 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | -966 | -857 |
| Varislig meting av dagsvirði | -471 | -483 |
| Aktiverað skattaaktiv | -7.020 | -5.400 |
| **Kjarnukapitalur, aftaná frádrøg** | **218.892** | **202.354** |
| | | |
| Eginpeningur | 227.349 | 209.094 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | -966 | -857 |
| Varislig meting av dagsvirði | -471 | -483 |
| Aktiverað skattaaktiv | -7.020 | -5.400 |
| Ábyrgdarlán | 25.500 | 25.500 |
| **Kapitalgrundarlag aftaná frádrøg** | **244.392** | **227.854** |
| | | |
| **Váðavektaðar ognir** | | |
| Vektað tøl við kredittváða | 1.043.592 | 974.327 |
| Vektað tøl við marknaðarváða | 97.870 | 84.220 |
| Vektað tøl við operationellum váða | 134.036 | 136.291 |
| **Vektað tøl tilsamans** | **1.275.498** | **1.194.838** |
| | | |
| Kapitalkrav sparikassans sambært grein 124, stk. 2 | 131.301 | 110.508 |
| | | |
| Solvensprosent | 19,2 % | 19,1 % |
| | | |
| Kjarnukapitalur aftaná frádrøg í prosentum av vektaðum tølum tilsamans | 17,2 % | 16,9 % |

# Yvirlit yvir notur


| Nota | | Síða |
|---|---|---|
| 1 | NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR | 29 |
| | NOTUR TIL RAKSTRARROKNSKAPIN | |
| 2 | RENTUINNTØKUR | 36 |
| 3 | RENTUÚTREIÐSLUR | 36 |
| 4 | KOSTNAÐAR- OG PROVISIÓNSINNTØKUR | 36 |
| 5 | VIRÐISJAVNAN | 36 |
| 6 | ÚTREIÐSLUR TIL STARVSFÓLK OG FYRISITING | 37 |
| 7 | AV- OG NIÐURSKRIVINGAR AV ÍTØKILIGUM OGNUM | 37 |
| 8 | AÐRAR RAKSTRARÚTREIÐSLUR | 37 |
| 9 | NIÐURSKRIVINGAR UPP Á ÚTLÁN V.M. | 38 |
| 10 | SKATTUR | 39 |
| | NOTUR TIL FÍGGJARSTØÐUNA | |
| 11 | OGN HJÁ FÍGGJARSTOVNUM OG TJÓÐBANKUM | 39 |
| 12 | ÚTLÁN | 39 |
| 13 | LÁNSBRØV | 39 |
| 14 | PARTABRØV | 39 |
| 15 | ÍTØKILIGAR OGNIR | 39 |
| 16 | ÚTSETT SKATTAÁOGN | 40 |
| 17 | AÐRAR OGNIR | 40 |
| 18 | SKULD TIL PENINGASTOVNAR OG TJÓÐBANKAR | 41 |
| 19 | INNLÁN | 41 |
| 20 | EFTIRSTILLAÐ KAPITALINNSKOT | 41 |
| 21 | ÁBYRGDARPENINGUR | 42 |
| 22 | AÐRAR SKYLDIR UTTANFYRI JAVNAN | 42 |
| | NOTUR UM AÐRAR UPPLÝSINGAR | |
| 23 | OGNARVIÐURSKIFTI | 42 |
| 24 | NÆRSTANDANDI PARTAR | 42 |
| 25 | NEVND OG STJÓRN | 42 |
| 26 | KREDITTVÁÐAR | 43 |
| 27 | MARKNAÐARVÁÐAR | 45 |

# Notur

Nota

1 Nýttur roknskaparháttur

## Alment

Ársroknskapurin er gjørdur í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi o.a. umframt kunngerð um framløgu av fíggjarligum frágreiðingum hjá kredittstovnum v.m. Roknskapurin er gjørdur eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár.

## Alment um ásetan og máting

Allar inntøkur verða roknaðar við í rakstrarroknskapin í mun til tað tíðarskeið, tær verða vunnar, og allar útreiðslur verða roknaðar við í tann mun, tær viðvíkja roknskaparárinum. Tó verða ávísir postar roknaðir beinleiðis umvegis eginognina, eftir at tann skattliga ávirkanin er ávikavist løgd afturat ella drigin frá.

Ogn verður roknað inn í fíggjarstøðuna, tá tað er sannlíkt, at fíggjarligir fyrimunir í framtíðini koma sparikassanum tilgóðar, og ein meting av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða roknaðar við í fíggjarstøðuna, tá tað er sannlíkt, at fíggjarligir fyrimunir í framtíðini ikki koma sparikassanum tilgóðar, og virðið av skyldini álítandi kann útroknast.

Keyp av fíggjarligum ognum verða roknað við í fíggjarstøðuna avrokningardagin. Somuleiðis verður hildið uppat við at rokna seldar fíggjarligar ognir við í fíggjarstøðuna avrokningardagin.

Hildið verður uppat at rokna fíggjarligar skyldur við í javnan, tá skyldan er hildin uppat gjøgnum uppfyllan, ella við at hon er sett ella farin úr gildi.

Við áseting og uppgerð av ognum og skyldum verður tikið atlit til upplýsingar, ið koma til okkara kunnleika eftir uppgerðardagin, og inntil vit gera ársfrásøgnina, um so er, at hesar upplýsingar staðfesta ella avnokta tey viðurskifti, ið eru komin fyri í seinasta lagi á uppgerðardegnum.

Tá ognir ella skyldur verða ásettar í fíggjarstøðuna á fyrsta sinni, verður hetta gjørt til dagsvirði. Tó verða fastar ognir ásettar til keypsprís, fyrstu ferð tær verða innsettar í fíggjarstøðuna.

Aftaná hetta verða ognir og skyldur uppgjørdar sum ásett fyri hvønn roknskaparpost sær niðanfyri. Keyp og søla av fíggjarligum ognum verða roknaðar við á avrokningardegnum.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða ásettar til amortiseraðan útveganarkostnað, soleiðis at tær verða roknaðar við einari støðugari effektivari rentu alt avtalutíðarskeiðið. Amortiserað útveganarvirði verður gjørt upp sum upprunaligt útveganarvirði við frádrátti av møguligum avdráttum og við ískoyti/frádráttum av allari amortiseringini av muninum millum útveganarkostnað og áljóðandi upphædd.

## Roknskaparligar metingar

Roknskaparliga virðið av ávísum ognum og skyldum eru fevnd av metingum um, hvussu hendingar í framtíðini kunna ávirka virði av hesum ognum og skyldum.

Tey øki, har roknskaparligar metingar hava størst ávirkan á roknskapin, eru fylgjandi:

- Niðurskrivingar upp á útlán
- Dagsvirði av føstum ognum
- Útsett skattaáogn

Tær metingar, ið eru gjørdar, eru við grundarlagi í fyritreytum, sum leiðslan metir vera forsvarligar, men sum eru ótryggar. Harumframt er sparikassin ávirkaður av váðum og ótryggleikum, ið kunnu føra við sær, at tey uppgjørdu úrslitini kunnu víkja frá metingunum.

### Niðurskrivingar upp á útlán

Niðurskrivingar upp á útlán verða gjørdar við at taka atlit at virðislækking á útlánum. Niðurskrivingar verða gjørdar sum ein samanseting av stakum niðurskrivingum og niðurskrivingum upp á bólkar, og eru fevndar av fleiri metingum, eitt nú fyri hvørji útlán ella bólkar av útlánum, er staðfest objektiv ábending um virðislækking, metingar um framtíðar gjaldingar og áseting av virði av veittum trygdum.

Tá talan er um niðurskrivingar upp á útlán og annan ágóða, eru týðandi metingar gjørdar í samband við ásetan av váðanum fyri, at ikki allar ásettar framtíðar gjaldingar verða móttiknar.

### Dagsvirði av føstum ognum

Tá dagsvirði av ognum til egna nýtslu og íløguognum verður ásett, er hetta knýtt at roknskaparligum metingum, íroknað tað, ið sparikassin metir, at ognirnar væntast at kasta av sær og krøv til avkastprosent, ið sett verða til ognirnar.

### Útsett skattaáogn

Framførd skattlig hall verða tikin við í uppgerðina av útsettari skattaáogn í tann mun, tað er sannlíkt, at tað verður roknað við, at tað í framtíðini væntast at verða ein skattskyldug inntøka til ráðs, har framførda hallið kann gagnnýtast.

### Samtaksroknskapur

Sparikassin eigur einki dóttirfelag, og ger tí ikki samtaksroknskap.

### Útlendskt gjaldoyra

Ágóði, skyldur og aðrir gjaldoyraligir postar í fremmandum gjaldoyra, ið ikki eru avroknað uppgerðardagin, verða umroknað við tí endakursi, sum er galdandi fyri viðkomandi gjaldoyra uppgerðardagin. Gjaldoyramunir, ið standast millum kursin handilsdagin, gjaldsdagin, og uppgerðardagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum 'Virðisjavnan'.

### Mótrokning

Áogn og skyldur verða bert mótroknaðar, um løgfrøðisligur rættur er til staðar at mótrokna upphæddir, og um tað er ætlanin at nettoavrokna ella realisera ognina og innfría skyldina samstundis.

## Rakstrarroknskapurin

### Rentur, kostnaður og provisiónir

Rentuinntøkur og rentuútreiðslur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin í tí tíðarskeiðinum, sum tær viðvíkja. Provisiónir og kostnaðarinntøkur, sum eru partar av effektivu rentuni av einum útláni, verða innroknaðar sum ein partur av amortiseraða kostprísinum og verða harvið inntøkuførdar yvir alt afturgjaldingarskeiðið á útláninum.

Rentuinntøkur av niðurskrivaðum parti av útláni verða førdar undir roknskaparpostinum niðurskrivingar upp á útlán og áognir v.m.

### Vinningsbýti av partabrøvum

Vinningsbýti av partabrøvum verður innroknað í rakstrarroknskapin, um sparikassin hevur rætt til at taka ímóti vinningsbýtinum. Hetta verður vanliga gjørt, tá vinningsbýtið er samtykt á umboðsráðsfundi felagsins.

### Virðisjavnan

Virðisjavnan umfatar realiserað og órealiserað virðisjavnan av fíggjarognum og øðrum avleiddum fíggjaramboðum og virðisjavnan av dagsvirði av íløgum í fasta ogn.

### Aðrar rakstrarútreiðslur

Aðrar rakstrarútreiðslur umfata útreiðslur, sum ikki roknast uppí aðrar postar í rakstrarroknskapinum, herundir gjald viðvíkjandi Innskjótaratrygdargrunninum og útgjald úr gávugrunni sparikassans.

### Niðurskrivingar upp á útlán og áogn v.m.

Niðurskrivingar upp á útlán og áogn v.m. inniheldur niðurskrivingar upp á útlán, áogn hjá peningastovnum og tjóðbankum og aðra áogn, sum kann hava við sær kredittváða. Eisini umfatað er burturlegging upp á ábyrgdir og óbrúktar kredittir og seinni virðisjavnan av hesum postum. Niðurskriving upp á ábyrgdir verður bókað sum burturlegging móti tapi upp á ábyrgdir. Niðurskriving upp á óbrúktar kredittir verður bókað sum aðrar burturlagdar skyldur.

### Skattur

Skattur í árinum umfatar ársins aktuella skatt og broyting í útsettum skatti. Skattur verður í rakstrarroknskapinum bókað við tí partinum, sum stavar frá ársúrslitinum og beinleiðis á eginkapitalin við tí partinum, sum stavar frá bókingum beinleiðis á eginognina.

## Fíggjarstøða

### Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum

Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum umfatar goymslu av peningaseðlum og myntum í øllum gjaldoyrum og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum.

### Áogn í peningastovnum og tjóðbankum

Áogn í peningastovnum og tjóðbankum umfatar áogn í peningastovnum og tíðarinnskot í tjóðbankum. Roknskaparposturin verður uppgjørdur sum amortiseraður kostprísur, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

### Útlán og aðrar áognir

Útlán og aðrar áognir verða uppgjørdar sum amortiseraður kostprísur frádrigið móttiknar kostnaðir og stovningarprovisiónir, har lagt er afturat munandi transaktiónskostnaðir, sum eru partur av effektivu rentuni á láninum.

Útlán og aðrar áognir verða javnan kannað fyri niðurskrivingartørv út frá fastløgdum objektivum ábendingum um virðisminking, partvíst einsæris fyri øll signifikant útlán og lán, sum ikki hóska í ein bólk, og partvíst sum bólkar av útlánum, sum hava felags eyðkenni viðvíkjandi kredittváða. Niðurskrivað verður við muninum millum roknskaparliga virðið áðrenn niðurskrivingar og nútíðarvirðið av væntaðu framtíðar gjaldsstreyminum av útláninum.

Ein objektiv ábending um virðisminking verður roknað at vera til staðar, um ein ella fleiri av hesum hendingum fyriliggja:

- Lántakarin er í fíggjarligum trupulleikum
- Lántakarin heldur ikki treytirnar í lánsavtaluni
- Treytirnar í lánsavtaluni vera gjørdar linari vegna lántakarans fíggjarligu trupulleikar
- ella tað er sannlíkt, at lántakarin fer í konkurs ella verður umfataður av aðrari fíggjarligari endurreisn.

Fyri útlán og ágóðar, sum ikki eru niðurskrivað einsæris, metir sparikassin fyri hvønn bólk av útlánum, hvørt talan er um objektiva ábending um virðisminking.

Sparikassin metir um niðurskrivingartørv av bólkum av útlánum, sum hava felags eyðkenni viðvíkjandi kredittváða. Sparikassin bólkar útlánini í 3 bólkar, ein fyri privatkundar og tveir fyri vinnukundar.

Metingin av bólkunum verður gjørd eftir einum segmenteringsmyndli, sum er mentur av Felagnum fyri Lokalar Pengastovnar, sum eisini stendur fyri viðlíkahaldi og framhaldandi menning av myndlinum. Myndilin fastleggur samanhangin i ymsu bólkunum millum staðfest tap og nakrar signifikantar forklárandi landsbúskaparligar variablar við eini linju regressiónsgreining. Sum variablar verður m.a. brúkt arbeiðsloysi, húsaprísir, renta, tal av konkursum/tvingsilssølum v.m.

Segmenteringsmyndilin er í útgangsstøðinum útroknaður grundað á tapsupplýsingar fyri allan peningastovnsgeiran. Sparikassin skal tí meta, um tilpassast skal til egin viðurskifti, soleiðis at tað eru hesi tilpassaðu estimatini, sum verða brúkt í útrokningini av niðurskriving upp á bólkar. Fyri hvønn bólk av útlánum og ágóðum fæst eitt estimat, sum sigur, hvussu stór virðisminkingin er í prosent av einum bólki á fíggjarstøðudagfestingini. Við at samanbera upprunaliga tapsváðan fyri einstaka útlánið við tapsváðan við endan á aktuella roknskaparskeiðnum, framkemur upphæddin frá einstaka útláninum til niðurskrivingarnar fyri bólkar.

## Leasing

Norðoya Sparikassi hevur hvørki leasingogn ella skyldur.

## Fíggjarlig ogn (lánsbrøv og partabrøv)

Fíggjarlig ogn sum t.d. lánsbrøv, partabrøv og aðrir kapitalpartar verða bókaðir til dagsvirði.

Fyri virðisbrøv, sum eru skrásett á keypskála, verður dagsvirðið ásett eftir alment noteraða kursinum við afturlating á fíggjarstøðudagfestingini, um ikki hesin kursur roknast fyri at vera misvísandi fyri veruliga dagsvirðið.

Í øllum øðrum førum verður dagsvirðið ásett eftir alment góðkendum virðisásetingarháttum, sum hava til endamáls at áseta transaktiónsprísin, sum hevði verið við handli á uppgerðardegnum millum óvildugar partar, sum handla eftir vanligum handilsligum fortreytum.

Tá virðið verður mált, verður hædd tikin fyri øllum kendum marknaðarupplýsingum, sum kunnu metast at hava ávirkan á dagsvirðið, og sum luttakarar á marknaðinum væntast at taka við í prísásetingini av viðkomandi fíggjaramboði.

Um so er, at álítandi dagsvirði ikki kann ásetast fyri ónoteraðar kapitalpartar, verður virðið sett til kostprís.

## Lánsbrøv til amortiseraðan kostprís

Íløgur sum sparikassin hevur heilt til gjalddagin, eru skrásettar á einum virknum marknaði, og eru keyptar við tí fyri eyga, at fáa vinning í tíðarskeiðinum fram til gjalddagin. Hesar íløgur, sum sparikassin hevur til gjalddagin, verða í fyrstu syftu roknaðar til dagsvirði, sum er kostprísur, umframt kostnaður ið beinleiðis kemur av keypinum. Í aðru syftu verða lánsbrøvini roknað til amortiseraðan kostprís og kunnu víkja frá dagsvirði.

## Íløguognir

Íløguognir umfata fastar ognir, sum sparikassin eigur, við tí endamáli at fáa leiguinntøkur og/ella kapitalvinning frá sølu.

Íløguognir verða settar til dagsvirði.

Dagsvirði fyri íløguognir verður sum høvuðsregla uppgjørt við støði í væntaða avkastinum av ognini eftir einum avkastprosenti, sum er einsæris ásett fyri ognina. Avkastprosentið er treytað av, hvar ognin liggur, slag av ogn, nýtslumøguleikum, innrætting og treytum í leigusáttmálum.

Fyri smærri ognir, sum regluliga verða handlaðar til almannakunngjørdar prísir, verður dagsvirðið ásett við støði í hesum prísum.

Virðisjavnan verður bókað yvir rakstrarroknskapin í roknskaparpostinum kursjavnan.

## Fastognir til egna nýtslu (domicilognir)

Fastognir til egna nýtslu (domicilognir) eru ognir, sum sparikassin brúkar til egnan rakstur sum fyrisiting, deild ella aðrar tænastur. Ognin verður roknað sum domicilogn, um meginparturin av samlaðu gólvvíddini verður brúktur til sparikassans egna rakstur.

Domicilognir skulu í fyrsta umfari ásetast til kostprís og í aðru atløgu ásetast til endurmett virði, sum er dagsvirði á metingardagfestingini frádrigið eftirfylgjandi av- og niðurskrivingar.

Kostprísurin umfatar útveganarvirðið og kostnaðin, sum beinleiðis stavar frá útvegan, inntil ognin var klár at taka í nýtslu.

Dagsvirðið verður ásett við støði í væntaða avkastinum og einum einsæris ásettum avkastprosenti.

Fyri smærri ognir, sum regluliga verða handlaðar til almannakunngjørdar prísir, verður dagsvirðið ásett við støði í hesum prísum.

Endurmetingar verða gjørdar soleiðis, at roknskaparliga virðið ikki víkir munandi frá dagsvirðinum á dagfestingini fyri fíggjarstøðuna.

Avskrivingar fyri domicilognir verða roknaðar eftir linjuháttinum yvir væntaðu nýtslutíðina við støði í endurmetta virðinum. Væntaða nýtslutíðin er 50 ár, svarandi til 2 % p.a. Grundstykkir verða ikki avskrivað.

Hækkingar í endurmetta virðinum á domicilognum verður beinleiðis ført yvir eginkapitalin, uttan so at hækkingin svarar til eina lækking, sum áður er tikin við í rakstrarroknskapin.

Fall í endurmetta virðinum á eini domicilogn verður tikið við í rakstrarroknskapin, uttan so at fallið svarar til eina hækking, sum áður er tikin við í rakstrarroknskapin. Í slíkum førum verður virðisfallið ført beinleiðis yvir eginkapitalin.

### Aðrar materiellar ognir

Aðrar materiellar ognir verða settar til kostprís frádrigið akkumuleraðar av- og niðurskrivingar. Kostprísurin umfatar útveganarvirðið og kostnaðin, sum beinleiðis stavar frá útvegan, inntil ognin var klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður eftir linjuháttinum yvir væntaða nýtslutíð fyri ognina upp á millum 3 og 16 ár. Málningar og onnur list verða ikki avskrivað.

### Ognir, ið eru fyribils ogn

Ognir, ið eru fyribils ogn, umfata ognir, sum eru yvirtiknar frá kundamillumverandi, sum bert er ogn sparikassans fyribils, og har søla væntast innan stutta tíð, og har søla er sera sannlík.

Materiell støðisogn, sum er fyribils ogn, verður bókað til lægra virðið av roknskaparliga virðinum og dagsvirðinum frádrigið sølukostnað.

### Onnur ogn

Onnur ogn umfatar ognir, sum ikki kunnu setast undir aðrar ognarpostar. Posturin umfatar mest áogn av rentum og provisiónum og positivt marknaðarvirði av avleiddum fíggjaramboðum.

Avleidd fíggjaramboð verða roknað til dagsvirði, ímeðan aðrir postar verða roknaðir til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar undir ogn umfata goldnar kostnaðir, sum viðvíkja seinni roknskaparárum.

Tíðaravmarkingar undir skuld umfata móttiknar provisiónir, sum viðvíkja seinni roknskaparárum. Tíðaravmarkingar verða roknaðar til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

### Eftirsett kapitalinnskot

Eftirsett kapitalinnskot verður tikið við, tá skyldan er átikin og roknað sum móttikin upphædd, frádrigið kostnaðir í hesum sambandi og við væntaðu uppskrivingini lagt afturat.

Í seinni tíðarskeiðum verður eftirstillað kapitalinnskot roknað til amortiseraðan kostprís, svarandi til kapitaliseraða virðið roknað við grundarlagi í effektivu rentuni.

### Onnur skuld og onnur fíggjarlig ábyrgd

Onnur skuld fevnir serliga um skyldugar rentur og provisiónir, kostnaðir og negativt marknaðarvirði av avleiddum fíggjarligum tólum.

Avleidd fíggjarlig tól setast til dagsvirði, ímeðan aðrir postar setast til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

### Skattur

Aktuellar skattaskyldur og aktuell áogn av skatti verða í fíggjarstøðuni bókað sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku, javnað fyri skatt av skattligum úrsliti frá undanfarnum árum. Útsettur skattur verður roknaður við grundarlagi í tíðarfráviki ímillum roknskaparlig og skattlig virði av ognum og skyldum.

Útsettur skattur verður roknaður við grundarlagi í skattareglum og skattaásetingum, sum eru galdandi á dagfestingini fyri fíggjarstøðuni.

Útsett skattaáogn verður roknað sum tann upphæddin, sum verður brúkt, til dømis við javnan av skatti av framtíðar vinningi, ella við mótrokning í útsettum skattskyldum innan somu løgfrøðisligu skattaeind.

### Avsetingar til útreiðslur

Starvsfólkaskyldur, ábyrgdir og aðrar skyldur, har stødd ella gjaldsfreist eru ókend, verður tikið við, tá tað á dagfestingini fyri fíggjarstøðuni er sannlíkt, at skyldan fer at kosta sparikassanum pening, og at upphæddin fyri skyldina kann gerast upp álítandi.

Skyldur roknast eftir bestu meting yvir teir kostnaðir, sum eru neyðugir fyri at innfría skyldina. Við útrokning av avsettum skyldum verður afturdiskontering gjørd, um tað hevur týdning.

### Innskjótaratrygdargrunnurin

Gjaldið til grunnin verður tikið við í rakstrarroknskapin undir aðrar rakstrarútreiðslur. Sparikassans skyldur umframt tann goldnað upphæddin er ein avsett skylda.

### Avleidd fíggjarlig tól

Avleidd fíggjarlig tól verða í fyrsta umfari tikin við í fíggjarstøðuna til kostprís og í øðrum umfari til dagsvirði. Positiv og negativ dagsvirði av avleiddum fíggjarligum tólum innganga undir aðrar ognir, ávikavist aðrar skyldur. Dagsvirðið av avleiddum fíggjarligum tólum verður uppgjørt við støði í marknaðarupplýsingum.

Broyting í dagsvirðinum av avleiddum fíggjarligum tólum, sum ikki hava støðu sum tryggingaramboð, verða tikin við undir virðisjavnan.

### Segmentupplýsingar

Av tí at virksemið og marknaðirnir ikki víkja frá innanhýsis, er í roknskapinum ikki upplýst um, hvussu netto rentu- og kostnaðarinntøkur og virðisjavnan er býtt upp á virkisøkir og á landafrøðiligar marknaðir.

### Komandi roknskaparreglur

Samstundis sum hesin roknskapur verður almannakunngjørdur, er roknskaparstandardurin IFRS 9 settur í gildi við virknaði frá 1. januar 2018. Roknskaparstandardurin IFRS 9 umfatar munandi broytingar til galdandi reglur fyri bólking og virðisáseting av fíggjarligum ognum, roknskaparligar niðurskrivingar og í ávísan mun reglur fyri roknskaparliga trygging.

Yvirskipaðu ásetingarnar í IFRS 9 eru samsvarandi settar inn í føroysku roknskaparkunngerðina og haraftrat eru serligar føroyskar og danskar niðurskrivingarreglur í fylgiskjali 10 til roknskaparkunngerðina, sum eru í tráð við yvirskipaðu meginreglurnar í IFRS 9.

Dagførda roknskaparkunngerðin verður sett í gildi samstundis sum IFRS 9, tvs. fyri roknskapartíðarskeið, ið byrja 1. januar 2018.

IFRS 9 reglurnar viðvíkjandi fíggjaramboðum, sum eru settar inn í føroysku roknskaparkunngerðina, hava fylgjandi ásetingar um bólking og virðisáseting og niðurskriving av fíggjarligum ognum.

IFRS 9 – bólking og virðisáseting:

Sambært IFRS 9 skal bólking og virðisáseting av fíggjarligum ognum grundast á handilsætlan fyri fíggjarligar ognir og sáttmálabundin gjøld, ið eru knýtt til fíggjarligu ognirnar.

Fíggjarligar ognir, ið eru ognaðar til tess at fáa sáttmálabundin gjøld, og har sáttmálabundnu gjøldini bert eru rentur og avdráttir, verða eftir fyrstu innroknan máldar til amortiseraðan kostprís.

Fíggjarligar ognir, ið eru ognaðar í eini blandaðari handilsætlan, har nakrar fíggjarligar ognir eru ognaðar til tess at fáa sáttmálabundin gjøld, meðan aðrar fíggjarligar ognir seljast, og har sáttmálabundnu gjøldini av fíggjarligu ognunum í tí blandaðu handilsætlanini bert eru rentur og avdráttir, verða eftir fyrstu innroknan sum útgangsstøði máld til dagsvirði gjøgnum aðra heildarinntøku. Fíggjarligu ognirnar eru tó partur av einari váðastýringsskipan og íløguætlan, ið eru grundaðar á dagsvirði, og innganga á hesum grundarlagnum í sparikassans leiðslurapportering. Tí metir sparikassin, at hesar fíggjarligu ognir ikki lúka krøvini til handilsætlan, ið er knýtt til málibólkarnar amortiseraðan kostprís og dagsvirði gjøgnum aðra heildarinntøku. Hesar fíggjarligu ognir verða ístaðin máldar til dagsvirði í rakstrarroknskapinum.

Fíggjarligar ognir, ið ikki lúka omanfyri nevndu krøv til handilsætlan, ella har sáttmálabundnu gjøldini ikki bert umfata rentur og avdráttir, verða eftir fyrstu innroknan máld til dagsvirði í rakstrarroknskapinum.

Nýtslan av IFRS 9 málibólkum fyri fíggjarligar ognir grundað á handilsætlan og eyðkenni við sáttmálabundnum gjøldum, væntast ikki at hava við sær munandi broytingar samanborið við tær meginreglur, ið eru nýttar í sparikassans ársfrásøgn fyri 2017.

IFRS 9 – niðurskrivingar:

Við IFRS 9 verða galdandi niðurskrivingarreglur, ið eru grundaðar á staðfest tap ("incurred losses"), broyttar til at taka støði í væntaðum tapum ("expected losses").

Nýggi niðurskrivingarmyndilin inniber, at ein fíggjarlig ogn við fyrstu innroknan verður niðurskrivað við eini upphædd, ið svarar til væntað kredittap í 12 mánaðir (stig 1). Um kredittváðin eftirfylgjandi økist munandi í mun til kredittváðan við fyrstu innroknan, verður ognin niðurskrivað við eini upphædd, ið svarar til væntað kredittap í restgildistíðarskeiðnum hjá ognini (stig 2). Um ognin verður staðfest sum virðisminkað (stig 3), verður ognin niðurskrivað við eini upphædd, ið svarar til væntað kredittap fyri restgildistíðarskeiðið, ið er størri enn í stig 2, og rentuinntøkur verða innroknaðar i rakstrarroknskapin grundað á effektiva rentu í mun til niðurskrivaðu upphæddina.

Niðurskrivingar upp á kundar í stig 1 og 2 eru grundaðar á myndilsútrokningar fyri allan bólkin, meðan niðurskrivingar upp á kundar í stig 3 eru grundaðar á individuellar metingar.

Myndilsútrokningar fyri bólkin verða gjørdar við útgangsstøði í einum PD-myndli ("Probabiliy of Default"), ið verður mentur og viðlíkahildin hjá sparikassans dátumiðstøð, og verður stýðjað av einum framskygdum makrobúskaparligum moduli, ið verður ment av Lokale Pengeinstitutter. Við framskygda makrobúskaparliga modulinum er møguligt at justera PD-virðini frá dátumiðstøðini, sum harvið verða justeraði í mun til útgangsstøði.

| Nota | | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 2 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | -301 | 0 |
| | Útlán | 64.887 | 65.887 |
| | Lánsbrøv | 2.179 | 2.028 |
| | Rentusáttmálar | -226 | 0 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **66.539** | **67.915** |
| | | | |
| 3 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 0 | 53 |
| | Innlán | 3.852 | 7.481 |
| | Eftirstillað kapitalinnskot | 2.069 | 2.074 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **5.921** | **9.608** |
| | | | |
| 4 | **Kostnaðar- og provisiónsinntøkur** | | |
| | Virðisbrøv og goymsla | 83 | 34 |
| | Gjaldstænastur | 2.473 | 2.241 |
| | Lánisakskostnaður | 3.790 | 2.846 |
| | Provisión av ábyrgdum | 1.299 | 1.319 |
| | Aðrar kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 2.172 | 1.729 |
| | **Tilsamans** | **9.817** | **8.169** |
| | | | |
| 5 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | 1.734 | 2.416 |
| | Partabrøv | 396 | 153 |
| | Íløguognir | -59 | 700 |
| | Gjaldoyra | 167 | 130 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **2.238** | **3.400** |

| Nota | | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 6 | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting** | | |
| | **Løn og samsýning til umboðsráð, nevnd og stjórn** | | |
| | Stjórn | 2.142 | 2.096 |
| | Nevnd | 1.048 | 800 |
| | Umboðsráð | 168 | 145 |
| | **Tilsamans** | **3.358** | **3.041** |
| | | | |
| | **Starvsfólkaútreiðslur** | | |
| | Løn | 20.505 | 20.390 |
| | Eftirløn | 3.496 | 3.297 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 3.924 | 3.677 |
| | **Tilsamans** | **27.925** | **27.364** |
| | | | |
| | Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 20.434 | 20.112 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting tilsamans** | **51.717** | **50.517** |
| | | | |
| | **Miðaltal av starvsfólkum, ársverk** | **43,1** | **41,5** |

Sparikassin hevur ikki í roknskaparárinum veitt avriksløn ella bonus, hvørki til nevnd, stjórn ella starvsfólk. Sparikassin hevur heldur ikki undanfarin ár veitt avriksløn ella bonus, og hevur ongar ætlanir um framyvir at gera tað.

Sparikassin hevur, umframt stjórn, útnevnt ein týðandi váðatakara, hvørs løn og samsýning ikki verður upplýst sambært kunngerð um lønarpolitikk v.m. § 15, stk. 2.

Stjórin kann av Norðoya Sparikassa uppsigast við 12 mánaðar freist og kann sjálvur siga upp við 3 mánaðar freist.

| Nota | | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Útreiðslur til grannskoðan** | | |
| | Samlað samsýning til tey umboðsráðsvaldu grannskoðaravirkini, ið fremja lógarkravdu grannskoðanina | 779 | 733 |
| | Harav annað arbeiði enn grannskoðan | 0 | 5 |

Norðoya Sparikassi hevur ikki innanhýsis grannskoðan.

| Nota | | 2017 | 2016 |
|---|---|---|---|
| 7 | **Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum** | | |
| | Bygningar | 1.074 | 1.227 |
| | Maskinur og innbúgv | 1.293 | 1.121 |
| | **Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum tilsamans** | **2.367** | **2.348** |
| | | | |
| 8 | **Aðrar rakstrarútreiðslur** | | |
| | Gjald til Innskjótaratrygdargrunnin | 0 | 0 |
| | Útgoldið úr gávugrunninum | 261 | 400 |
| | **Aðrar rakstrarútreiðslur tilsamans** | **261** | **400** |

| Nota | | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 9 | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m.** | | |
| | **Individuellar niðurskrivingar** | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 27.144 | 31.765 |
| | Niðurskrivingar upp á útlán í árinum | 10.967 | 8.579 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -4.983 | -6.742 |
| | Avskrivingar (staðfest tap) | -1.919 | -6.458 |
| | **Akkumuleraðar individuellar niðurskrivingar upp á útlán við ársenda** | **31.209** | **27.144** |
| | | | |
| | Niðurskrivað útlán tilsamans, áðrenn niðurskrivingar | 85.546 | 90.878 |
| | Individuellar niðurskrivingar tilsamans | -31.209 | -27.144 |
| | **Niðurskrivað útlán tilsamans, eftir niðurskrivingar** | **54.337** | **63.734** |
| | | | |
| | **Bólkaðar niðurskrivingar** | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 5.902 | 5.715 |
| | Niðurskrivingar upp á útlán í árinum | 654 | 1.237 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -2.185 | -1.050 |
| | **Akkumuleraðar bólkaðar niðurskrivingar upp á útlán við ársenda** | **4.371** | **5.902** |
| | | | |
| | Niðurskrivað útlán tilsamans, áðrenn niðurskrivingar | 1.385.549 | 1.636.378 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar tilsamans | -4.371 | -5.902 |
| | **Niðurskrivað útlán tilsamans, eftir niðurskrivingar** | **1.381.178** | **1.630.476** |
| | | | |
| | **Niðurskrivingar tilsamans** | **35.580** | **33.046** |
| | | | |
| | **Individuellar burturleggingar upp á ábyrgdir** | | |
| | Akkumuleraðar burturleggingar upp á ábyrgdir við ársbyrjan | 93 | 93 |
| | Burturleggingar í árinum | 0 | 0 |
| | Afturførdar burturleggingar | -93 | 0 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar upp á ábyrgdir við ársenda** | **0** | **93** |
| | | | |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar tilsamans** | **35.580** | **33.139** |
| | | | |
| | **Samanseting til rakstrarroknskapin** | | |
| | Individuellar niðurskrivingar upp á útlán netto | 4.603 | 1.837 |
| | Individuellar burturleggingar upp á ábyrgdir netto | -93 | 0 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar netto | -1.531 | 187 |
| | Renta av niðurskrivaðum parti av lánum | -1.944 | -1.396 |
| | Staðfest tap í árinum, ið ikki áður eru niðurskrivað | 1.919 | 1.185 |
| | Inngoldið til áður avskrivað krøv | -121 | -134 |
| | Niðurskrivingar av yvirtiknum ognum | 333 | 1.621 |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar til rakstrarroknskapin í árinum** | **3.166** | **3.300** |

| Nota | | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 10 | **Skattur** | | |
| | Broyting av útsettum skatti | 1.620 | 0 |
| | Goldin skattur | 0 | 0 |
| | **Tilsamans** | **1.620** | **0** |
| | | | |
| 11 | **Ogn hjá peningstovnum o. ø.** | | |
| | Uttan uppsøgn | 122.609 | 81.920 |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 0 | 0 |
| | **Ogn hjá peningastovnum o.ø. tilsamans** | **122.609** | **81.920** |
| | | | |
| 12 | **Útlán** | | |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 22.216 | 3.684 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 197.393 | 147.527 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 596.289 | 587.593 |
| | Yvir 5 ár | 993.388 | 955.406 |
| | **Útlán tilsamans** | **1.809.286** | **1.694.210** |
| | | | |
| 13 | **Lánsbrøv** | | |
| | Skrásett á keypskálum - dagsvirði | 440.125 | 462.048 |
| | Skrásett á keypskálum - amortiserað kostprís | 0 | 10.053 |
| | **Lánsbrøv tilsamans** | **440.125** | **472.101** |
| | Munur á amortiseraðum kostprísi og dagsvirði | 0 | 61 |
| | **Lánsbrøv til dagsvirði tilsamans** | **440.125** | **472.162** |
| | | | |
| 14 | **Partabrøv** | | |
| | Onnur partabrøv | 12.330 | 12.325 |
| | **Partabrøv tilsamans** | **12.330** | **12.325** |
| | | | |
| 15 | **Ítøkiligar ognir** | | |
| | **Fastognir** | | |
| | Íløguognir | | |
| | Dagsvirði við ársbyrjan | 8.521 | 7.559 |
| | Tilgongd | 178 | 0 |
| | Frágongd | 0 | -7.000 |
| | Aðrar broytingar í árinum | -59 | 700 |
| | Umflokking frá yvirtiknum ognum | 0 | 7.262 |
| | **Dagsvirði við ársenda** | **8.640** | **8.521** |
| | | | |
| | **Ognir til egna nýtslu** | | |
| | Bókað virði við ársbyrjan | 14.763 | 15.093 |
| | Tilgongd | 1.365 | 1.859 |
| | Frágongd | 0 | -962 |
| | Av- og niðurskrivingar í árinum | -1.074 | -1.227 |
| | Broytingar til endurmett virði | 0 | 0 |
| | **Bókað virði við ársenda** | **15.054** | **14.763** |
| | | | |
| | **Bókað virði av føstum ognum við ársenda** | **23.694** | **23.284** |

Virðisáseting er gjørd av innanhýsis metingarfólki

| Nota | | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 15 | **Ítøkiligar ognir (framhald)** | | |
| | **Maskinur, innbúgv o.a.** | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 45.047 | 44.070 |
| | Tilgongd | 1.086 | 977 |
| | Frágongd | 0 | 0 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **46.133** | **45.047** |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | 37.030 | 35.908 |
| | Avskrivingar í árinum | 1.293 | 1.122 |
| | **Avskrivingar við ársenda** | **38.323** | **37.030** |
| | **Bókað virði av maskinum, innbúgv o.a. við ársenda** | **7.810** | **8.017** |
| 16 | **Útsett skattaáogn** | | |
| | Samlað skattligt hall | 92.603 | 109.044 |
| | Roknaður skattur | 18 % | 18 % |
| | Roknaður skattur av halli | 16.669 | 19.628 |
| | Niðurskriving av skattaáogn | -9.649 | -14.228 |
| | Útsett skattaáogn tilsamans | 7.020 | 5.400 |
| | Aktuellur skattur | 0 | 0 |
| | Broyting í útsettum skatti | 1.620 | 0 |
| | **Skattur tilsamans** | **1.620** | **0** |
| | **Skattaavstemman** | | |
| | Galdandi skattaprosent | 18 | 18 |
| | Fyribils frávik | -18 | -18 |
| | Varandi frávik | 0,5 | 0,5 |
| | **Effektivt skattaprosent** | **0,5** | **0,5** |

Við ársbyrjan 2017 hevði sparikassin framført skattligt hall frá undanfarnum árum upp á tilsamans 109 mió. kr. Eftir at roknskapurin seinastu 5 árini hevur víst skattligt avlop, hevur sparikassin valt at taka útsettu skattaáognina við í roknskapin fyri 2017 eins og í 2015 og 2016. Í 2015 og 2016 var skattskylduga inntøkan komandi 3 árini mett til 30 mió. kr., ið svarar til útsetta skattaáogn á 5,4 mió. kr. Í 2017 er avlopið komandi 3 árini endurmett til 39 mió. kr., ið svarar til útsetta skattáogn á 7 mió. kr., og sostatt hevur sparikassin inntøkuført útsetta skattaáogn á 1,6 mió. kr. í 2017. Varisliga metingin av avlopinum komandi 3 árini tekur støði í skattskyldugu inntøkuni seinastu 3 árini.

| | | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 17 | **Aðrar ognir** | | |
| | Roknaðar rentur tilgóðar | 1.772 | 1.574 |
| | Aðrar ognir | 4.530 | 9.968 |
| | **Aðrar ognir tilsamans** | **6.302** | **11.542** |

| Nota | | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 18 | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar** | | |
| | Skuld til tjóðbankar | 0 | 0 |
| | Skuld til peningastovnar | 21 | 0 |
| | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar tilsamans** | **21** | **0** |
| | | | |
| | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar eftir avtalutíðarskeiði** | | |
| | Uttan uppsøgn | 21 | 0 |
| | | | |
| 19 | **Innlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 1.131.710 | 1.095.594 |
| | Við uppsøgn | 619.148 | 531.105 |
| | Tíðarinnskot | 302.460 | 296.383 |
| | Serinnlán | 173.499 | 196.239 |
| | **Innlán tilsamans** | **2.226.817** | **2.119.321** |
| | | | |
| | **Innlán eftir avtalutíðarskeiði** | | |
| | Uttan uppsøgn | 1.208.912 | 1.102.254 |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 312.675 | 281.148 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 438.989 | 436.311 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 65.253 | 101.046 |
| | Yvir 5 ár | 200.988 | 198.562 |
| | **Innlán tilsamans** | **2.226.817** | **2.119.321** |
| | | | |
| 20 | **Eftirstillað kapitalinnskot** | | |
| | Ábyrgdarlán við ársbyrjan | 25.500 | 25.500 |
| | Tilgongd í árinum | 0 | 0 |
| | **Ábyrgdarlán við ársenda** | **25.500** | **25.500** |
| | | | |
| | **Eftirstillað kapitalinnskot tilsamans** | **25.500** | **25.500** |

25.500 tkr. verða taldar upp í kapitalgrundarlagið tann 31. desember 2017.

Ábyrgdarlánið er veitt av trimum føroyskum íleggjarum við eins treytum:
Lánið verður rentað við 8 % og er galdandi til 31. desember 2023. Lánið kann ikki sigast upp av hvørki lántakara ella lángevara og kann í fyrsta lagi verða afturgoldið tann 31. desember 2018. Lántakari kann, um Fíggjareftirlitið frammanundan gevur loyvi til tess, afturgjalda upp til 20 % av høvuðsstólinum um árið í tíðarskeiðinum tann 31. desember 2018 til 31. desember 2023 til kurs 100. Harafturat kann lántakari, um fíggjareftirlitið frammanundan gevur loyvi til tess, afturgjalda lánið til kurs 103 fram til 31. desember 2019, til kurs 102 fram til 31. desember 2020, til kurs 101 fram til 31. desember 2021 og til kurs 100 fram til 31. desember 2022. Lánið er eftirstillað alla aðra ikki eftirstillaða skuld, men er stillað frammanfyri hybridan kjarnukapital og ábyrgdarpening. Um Fíggjareftirlitið gevur loyvi til tess, kann lántakari niðurskriva ábyrgdarlánið.

| Nota | | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 21 | **Ábyrgdarpeningur** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 18.091 | 16.470 |
| | Broytingar, netto | 1.715 | 1.621 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **19.806** | **18.091** |
| | | | |
| 22 | **Aðrar skyldur uttanfyri javnan** | | |
| | Fíggjarábyrgdir | 6.564 | 8.219 |
| | Tapsábyrgdir | 10.270 | 8.225 |
| | Aðrar skyldur | 49.042 | 48.519 |
| | **Aðrar skyldur uttanfyri javnan tilsamans** | **65.876** | **64.963** |

Sparikassin er eisini bundin av leigusáttmálum og stuðulssáttmálum, sum tilsamans er 2.445 tkr. fyri alt árið 2018.

Sparikassin samstarvar við SDC og er bundin av at gjalda ein kostnað á 19 mió. kr. um sparikassin tekur seg úr hesum samstarvi.

23 **Ognarviðurskifti**

Norðoya Sparikassi er ábyrgdarsparikassi og er sjálvsognarstovnur. Sparikassin hevur á leið 2000 ábyrgdarar, sum 4. hvørt ár velja eitt umboðsráð, ið telur 39 limir.

24 **Nærstandandi partar**

Nærstandandi partar hjá Norðoya Sparikassa eru:

Nevndar- og stjórnarlimir

Allar avtalur millum nærstandandi partar og Norðoya Sparikassa eru gjørdar til marknaðartreytir.
Avtalur við nevndar- og stjórnarlimir umfata bert vanliga løn, meðan eksponeringar við nevndar- og stjórnarlimir framganga av notu 25.

| | | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 25 | **Nevnd og stjórn** | | |
| | Lán, veðhald, borgsskyldur ella ábyrgdir og trygdir, stovnað fyri stjórn og nevnd sparikassans ella nærstandandi hjá hesum. | | |
| | Stjórn, rentustig 3,1 % | 1.409 | 1.493 |
| | Nevnd, rentustig 2,5 % - 10,25 % | 6.511 | 24.156 |
| | Tilhoyrandi trygdir | | |
| | Stjórn | 2.000 | 2.000 |
| | Nevnd | 7.764 | 20.910 |

Vísandi til kunngerð um fíggjarligar frágreiðingar frá kredittstovnum § 119, stk. 4, hevur sparikassin valt ikki at upplýsa um hesi viðurskifti hjá umboðsráðnum.

Nota

26 Kredittváðar

**Vinnugreinamiðsavnan**

Sparikassin hevur í kredittpolitikki sínum ásett at vinnulán kunnu vera upp til 40 % av kredittváða sparikassans. Lán til privat og almennar myndugleikar skulu sostatt vera minst 60 % av kredittváðanum.

Vinnuligi parturin var ultimo 2017 eftir niðurskrivingar 32,8 % í mun til 32,1 % í 2016.

Lán til almennar myndugleikar var 6,4 % í 2017, sum er tað sama sum eitt ár frammanundan. Sparikassin ynskir at økja partin av lánveiting til tað almenna.

Kredittpolitikkurin ásetur mørk fyri hvussu stór eksponeringin í hvørji einstakari vinnugrein kann vera í mun til samlaða kredittváðan hjá sparikassanum. Hetta er fyri at sparikassin ikki verður yvireksponeraður í nakrari ávísari vinnugrein.

Sparikassin metir, at vinnulán sparikassans hava eina hóskandi spjaðing á vinnugreinar.

Talvan niðanfyri vísir býtið av kredittváða sparikassans íroknað ábyrgdir og eftir niðurskrivingar og burturleggingar:

| | 2017 | 2016 |
|---|---|---|
| Almennir myndugleikar | 6,4 % | 6,4 % |
| Vinna: | | |
| - Fiskivinna | 2,3 % | 2,2 % |
| - Framleiðsluvinna | 3,1 % | 4,2 % |
| - Orkuveiting | 0,3 % | 0,0 % |
| - Byggivinna | 5,2 % | 4,1 % |
| - Handil | 7,1 % | 9,6 % |
| - Flutningur, matstovu og gistingarhúsvinna | 3,0 % | 2,1 % |
| - Kunning og samskifti | 0,1 % | 0,1 % |
| - Kreditt-, fíggingar og tryggingarvinna | 0,4 % | 0,3 % |
| - Handil og umsiting av fastari ogn | 7,9 % | 6,2 % |
| - Aðrar vinnur | 3,4 % | 3,4 % |
| Vinnur tilsamans | 32,8 % | 32,1 % |
| Privat | 60,8 % | 61,5 % |
| Tilsamans | 100 % | 100 % |

| | 2017<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|
| **Vektaðir postar í samband við kredittváða** | | |
| Stjórnir, tjóðbankar, lokalir myndugleikar o.tl. | 2.715 | 1.277 |
| Fíggjarstovnar | 25.231 | 20.715 |
| Vinnukundar | 200.669 | 215.337 |
| Detailkundar | 319.140 | 293.507 |
| Tryggjað við veð í fastogn | 309.015 | 292.721 |
| Trot og eftirstøður | 84.422 | 86.767 |
| Høgur váði | 45.157 | 1.149 |
| Partabrøv | 12.330 | 12.325 |
| Dekkað lánsbrøv | 0 | 0 |
| Aðrar eksponeringar, herundir aktiv uttan mótpart | 44.913 | 50.530 |
| Tilsamans | 1.043.592 | 974.327 |

26 **Kredittváðar (framhald)**

**Bonitetsbólking**

Sparikassin bólkar øll útlán í bonitetsbólkar samsvarandi karakterstiga Fíggjareftirlitisins. Bólkarnir eru hesir: Bólkur "3" eru kundar við góðum boniteti, "2a" eru kundar við vanligum boniteti, "2b" eru kundar við ávísum veikleikateknum, "2c" eru kundar við munandi veikleikateknum og "1" eru niðurskrivingarkundar.

Sparikassin endurmetir regluliga ásetingina av boniteti. Sparikassin avsetur orku til at viðgera veikar eksponeringar rættstundis, herundir serliga eksponeringar við boniteti "2c" og "1", hetta fyri at fyribyrgja størri niðurskrivingum og avskrivingum.

Bonitetsásetingin hevur eisini týðandi leiklut í sambandi við viðgerð av nýggjum lániumsóknum.

**Geografisk eksponering**

Lánikundar sparikassans eru í størstan mun at finna í økinum kring deildir sparikassans, sum eru í Klaksvík, Fuglafirði og Tórshavn. Eitt sindur meira enn helmingurin er í og kring Klaksvík. Sparikassin metir at landafrøðiliga spjaðingin í útlánum sparikassans er umboðandi fyri alt landið, og tí ikki er at rokna sum ein serligur váði. Hinvegin ásannar sparikassin, at føroyski búskapurin er merktur av størri sveiggjum enn størri búskapir, sum byggja á meiri fjøltáttaða framleiðslu, og at tað kann roknast at síggjast aftur í fíggjargeiranum.

**Stórar eksponeringar, sum eru størri enn 10 % av kapitalgrundarlagnum**

Sparikassin hevur nakrar eksponeringar, sum eru 10 % ella meira av kapitalgrundarlagnum. Summurin av stórum eksponeringum var tilsamans 41,4 % av kapitalgrundarlagi sparikassans í 2017, í mun til 46,3 % eitt ár frammanundan. Eftirlitsdiamanturin hjá Fíggjareftirlitinum ásetur markið til 125 %. Sparikassin er nøgdur við gongdina í lyklatalinum fyri stórar eksponeringar, men væntar at tað er á einum lægri støði við endan á 2018.

**20 tær størstu eksponeringarnar hjá sparikassanum**

Frá 1. januar 2018 er ein broyting í ávaringartekninum í eftirlitsdiamantinum viðvíkjandi stórum eksponeringum sett í gildi. Hereftir kunnu 20 tær størstu eksponeringarnar, aftaná ávísar frádráttir, í mesta lagi vera 175 % af kjarnukapitalinum. Eksponeringar móti almennum stovnum verða ikki roknaðar við.

Sparikassin hevur uppgjørt hetta lyklatal til 146,4 % við ársenda 2017. Sparikassin metir, at mest hóskandi er, at lyklatalið er í mesta lagi 150 % og væntar sparikassin at lyklatalið verður á sama støði við ársenda 2018.

Umtalaðu eksponeringarnar høvdu hetta bonitetsbýti:

| | 2017 |
|---|---|
| Bonitetur | % partur |
| 3 og 2a | 76 % |
| 2b | 21 % |
| 2c | 3 % |
| 1 | 0 % |
| **Tilsamans** | **100 %** |

Hesar eksponeringar eru til samans 320 mió. kr. eftir niðurskrivingar og burturleggingar, svarandi til 17 % av samlaðu eksponeringunum eftir niðurskrivingar og burturleggingar.

Sparikassin hevur sum heild góðar trygdir og avmarkað blanko. Í sparikassans solvenstørvi verður blanko viðvíkjandi kundum, sum eru størri enn 2 % av kapitalgrundarlagi sparikassans og sum hava bonitet 1 og 2c, og sum ikki er niðurskrivað, avsett við 100 %.

Nota

26 **Kredittváðar (framhald)**

**Privatkundar**

Yvirhøvur eru útlán sparikassans til privat í stóran mun fevnd av trygd í bústøðum og øðrum aktivum. Sparikassin hevur vanliga 1. veðrætt í bústaðinum.

Eksponeringar móti privatkundum vóru 60,9 % av kredittváða sparikassans við árslok 2017, tá niðurskrivingar og burturlegginger eru frádrignar. Váði sparikassans frá privatum eksponeringum avspeglar búskaparligu gongdina í landinum, herundir gongdina í tøka peninginum eftir skatt hjá húsarhaldunum og prísgongdini á húsamarknaðinum.

Eksponeringar móti privatkundum áðrenn niðurskrivingar høvdu hetta bonitetsbýti í 2017 og 2016:

| | 2017 | | 2016 | |
|---|---|---|---|---|
| Bonitetur | % partur | mió. kr. | % partur | mió. kr. |
| 3 og 2a | 64 % | 756 | 65 % | 723 |
| 2b | 27 % | 321 | 25 % | 281 |
| 2c | 2 % | 26 | 2 % | 21 |
| 1 | 7 % | 81 | 8 % | 88 |
| **Tilsamans** | **100 %** | **1.184** | **100 %** | **1.113** |

Av útlánum til privat er niðurskrivað individuelt 18 mió. kr.

Sparikassin er nøgdur við samansetingina av boniteti hjá privatkundum.

Kapitalur til dekning av kredittváða frá kundum við fíggjarligum trupulleikum

Í uppgerð av solvenstørvi ultimo 2017 hevur sparikassin avsett 8 % av vektaðum ognum. Afturat hesum hevur sparikassin avsett tilsamans 9,3 mió. kr. eyka móti møguligum tapum vegna útlán til kundar við fíggjarligum trupulleikum. Í tann mun sparikassin kemur at staðfesta niðurskrivingartørv upp á hesi útlán í framtíðini, verður niðurskrivingin bókað í rakstrarroknskapi sparikassans og tikin úr uppgerðini fyri solvenstørv. Treytað av, at avsetingin er nøktandi, ávirka hesar niðurskrivingar ikki yvirdekningin í solvensi sparikassans, sum er munurin millum solvenstørv og faktiskan solvens.

| | 2017 | 2016 |
|---|---|---|
| | 1.000 DKK | 1.000 DKK |
| 27 **Marknaðarváðar** | | |
| **Rentuváði** | | |
| Rentuváði av fíggjartólum | 3.815 | 4.711 |
| Rentuváði í % av kjarnukapitali aftaná frádráttir | 1,7 % | 2,3 % |
| **Gjaldoyraváði** | | |
| Ogn í fremmandum gjaldoyra | 1.453 | 662 |
| Skuld í fremmandum gjaldoyra | 0 | 0 |
| **Gjaldoyraábending** | **1.453** | **662** |
| Gjaldoyraábending í % av kjarnukapitali aftaná frádráttir | 0,7 % | 0,3 % |

www.ns.fo